# INNIHALDSYVIRLIT

1. Formæli landsstýrismansins við fíggjarmálum ... 3
2. Inngangur ... 4
3. Altjóða búskapurin ... 5
3.1 Gongdin og útlitini í altjóða búskapinum ... 5
3.2 Føroyski búskapurin í altjóða høpi ... 7
4. Føroyski búskapurin ... 10
4.1 Gongdin í bruttotjóðarúrtøkuni ... 10
4.2 Gongdin í fiskivinnuni ... 11
4.3 Gongdin í alivinnuni ... 12
4.4 Gongdin í virkseminum annars ... 13
4.5 Gongdin í nýtsluni ... 14
4.6 Gongdin í handilsjavna og uttanlandsskuld ... 14
4.7 Gongdin í inflasjónini ... 15
4.8 Gongdin í fíggjarliga sektorinum ... 15
4.9 Gongdin í arbeiðsloysinum ... 15
5. Búskaparpolitikkur og fíggjarlógaruppskotið 2005 ... 17
5.1 Búskaparpolitikkurin 2005 ... 17
5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2005 ... 17
5.3 Gongdin í inntøkum landskassans ... 18
5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans ... 19
5.5 Gongdin í skuld landskassans ... 21
5.6 Løgur 2005 ... 21
6. Høvuðsraðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2005 ... 24
6.1 Raðfestingar undir § 2, Løgmansfyrisitingin ... 26
6.2 Raðfestingar undir § 3, Fíggjarmál ... 27
6.3 Raðfestingar undir § 5, Fiskivinna ... 29
6.4 Raðfestingar undir § 6, Vinnumál ... 31
6.5 Raðfestingar undir § 7, Útbúgving og gransking ... 35
6.6 Raðfestingar undir § 8, Almanna- og heilsumál ... 37
6.7 Raðfestingar undir § 15, Innlendismál ... 41

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

## 1. Formæli landsstýrismansins við fíggjarmálum

Búskaparpolitiska høvuðsmálið við fíggjarlógaruppskotinum 2005 er at stimbra virksemið í samfelagnum mest møguligt í einari tíð við ongum vøkstri í búskapinum. Raðfestingarnar í fíggjarlógaruppskotinum skulu virka arbeiðsskapandi undir teimum avmarkingum, ið eru settar í samgonguskjalinum.

Fíggjarlógaruppskotið 2005 byggir á avtalurnar í samgonguskjalinum, har tað m.a. er ásett, at rikin verður ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur, har endamálið er at tálma sveiggjum í búskapinum. Málið er samstundis at fáa javnvág aftur á fíggjarlógina.

Nú vøksturin í búskapinum er steðgaður, er tað ein stór politisk avbjóðing at leggja eina fíggjarlóg tilrættis, har hallið ikki skal vaksa, samstundis sum fíggjarlógin ikki skal virka tálmandi á virksemið í landinum.

Um samgongan skal megna at fullføra tær raðfestingar, hon hevur sett sær fyri komandi árini, verður neyðugt at gera ítøkilig og sjónlig inntriv í virksemið hjá landinum. Úteiðslurnar skulu tillagast minni inntøkur, uttan at hetta tálmar gongdini í virkseminum.

Arbeiðsskapandi raðfestingarnar eru býttar soleiðis, at tær eru mest arbeiðsskapandi har í landinum, har arbeiðsloysið er størst. Eldra- og heilsuøkið eru eisini raðfest ovarlaga.

Eitt tað fyrsta málið hjá hesi samgonguni var at minka um miðfyrisitingina. Talið á landsstýrismonnum varð skorið úr 9 niður í 7 landsstýrismenn, samstundis sum tað nú eru 2 aðalráð minni. Í kjalarvørrinum á hesum eru tillagingar gjørdar í miðfyrisitingini, og hava hesar havt uppsagnir við sær.

Samgongan fer at gera enn fleiri tillagingar í fyrisiting og almennum tænastustovnum, har spjaddar eindir verða lagdar saman í størri eindir. Hetta fer at gera fyrisiting og almennar tænastustovnar effektivari og fakliga sterkari. Hetta er bæði ein rationalisering og tillaging av almenna sektorinum til føroysk viðurskifti. Samanlagt verða tað tó fleiri fólk í almenna sektorinum í 2005 enn í 2004.

Sparingarnar frá hesum rationaliseringum skulu brúkast til tey øki, sum samgongan ætlar at raðfesta hægri. Tey eru m.a. eldra- og heilsuøkið, gransking, arbeiðsskapandi virksemi og skattalætti.

***Bárður Nielsen***

## 2. Inngangur

Endamálið við hesi frágreiðing er m.a. at lýsa, hvussu landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur búskaparpolitikkin til rættis undir teimum búskaparligu fortreytum, sum eru, og teimum stevnumiðum, sum samgongan er samd um.

Fyrst er ein stutt lýsing av gongdini og útlitunum í altjóða búskapinum. Síðan verður umframt ein lýsing av ymiskum viðurskiftum, ið hava týdning fyri gongdina í altjóða búskapinum, eisini verður gongdin og útlitini í búskapunum í norðurlondum lýst. At enda er ein stutt lýsing av føroyska búskapinum í altjóða høpi.

Næsti parturin í frágreiðingini er ein meira nágreinilig lýsing av gongdini og útlitunum í føroyska búskapinum. Gongdin og útlitini í ymiskum týdningarmiklum pørtum í føroyska búskapinum verða lýst við tí vitan og tølum, ið vóru tøk í september 2004.

Triði parturin er um fíggjarlógaruppskotið og búskaparpolitikkin í 2005. Ymiskar greiningar eru av inntøkum og útreiðslum landskassans seinastu árini. Stutt frágreiðing er eisini um støddina og samansetingina av skuld landskassans. At enda er ein útgreinað løguætlan fyri 2005.

Síðsti parturin eru frágreiðingar frá hvørjum einstøkum landsstýrismanni, har viðkomandi landsstýrismaður greiðir frá høvuðsraðfestingunum innan sítt øki í fíggjarlógaruppskotinum 2005.

## 3. Altjóða búskapurin

*Framgongd er nú í altjóða búskapinum*

Lítil og eingin vøkstur hevur verið í altjóða búskapinum í nógv ár, men nú er vend komin í. Rættilig framgongd er í búskapinum í USA og Asiu, og týðulig tekin eru um, at ferðin er við at økjast í búskapunum í evruøkinum.

### 3.1 Gongdin og útlitini í altjóða búskapinum

*Búskaparframgongdin grundað á lagaligan búskaparpolitikk*

Vøksturin í búskapinum í USA er grundaður á søguliga lagaligan penga- og fíggjarpolitikk, men fyri at fyribyrgja inflasjónstrýsti, er miðbankin í USA nú farin at hækka pengapolitisku stýringsrentuna. Í Bretlandi hevur miðbankin eisini hækkað rentuna, men í evruøkinum hendir neyvan nakað við rentuni í bræði.

*Búskaparframgongdin sett ferð á altjóða handilin*

Framgongdin í altjóða búskapinum hevur sett veruliga gongd í altjóða handilin. Her er tað serliga Kina, har búskaparvøksturin hevur verið ómetaliga stórur, sum hevur verið drívmegin. Kinverski marknaðurin er nú opin fyri øðrum londum, eftir at Kina gjørdist limur í heimshandilsfelagsskapinum WTO í 2000. Kinverski innflutningurin vaks við 44% í 2003.

*Búskaparframgongdin førir við sær hægri rávøruprísir*

Altjóða búskaparframgongdin hevur økt munandi um eftirspurningin eftir rávørum, og rávøruprísirnir eru tí nógv hækkaðir. Hetta merkist ikki so væl í Evropa, tí evran er samstundis styrkt mótvegis dollaranum, og týdningurin av rávørum er lutfalsliga minni í dag enn í 1990-árunum. Hækkandi rávøruprísir kunnu tó vera fyrsta ávaringin um vaksandi inflasjónstrýst í altjóða búskapinum.

*Oljuprísirnir í dollarum nógv hækkaður*

Á altjóða rávørumarknaðinum hevur gongdin í oljuprísinum stóran áhuga. Oljuprísurin er nógv hækkaður í dollarum, men í krónum er hann framvegis lægri enn í 2000. Í mun til aðrar nýtsluvørur er lutfalsligi prísurin á olju í dag eitt sindur hægri enn fyrst í 1990-árunum, men hann er væl lægri enn síðst í 1970-árunum og byrjanini av 1980-áunum.

*Høgu oljuprísirnir fara neyvan at tálma búskaparvøkstrinum stórvegis*

Bæði framleiðsluvinna og privat húsarhald eru nógv minni bundin av olju í dag enn í byrjanini av 1980-árunum. Í OECD verður mett, at miðaloljuprísurin verður lægri í 2005 enn í ár. Mett verður tí, at høgu oljuprísirnir fara neyvan at tálma altjóða búskaparvøkstrinum stórvegis, men gongdin í oljuprísinum er tó ein váði fyri búskaparvøksturin. Tað er stóri eftirspurningurin í Asiu og óttin fyri altjóða yvirgangi, sum eru atvoldin til høgu oljuprísirnar.

*Vøksturin í evroøkinum verður størri í 2005 enn í ár*

Í evruøkinum verður mett, at vøksturin í ár verður 1,9% og 2,4% í 2005. Hetta er meir enn mett var fyrr í ár. Sama er galdandi fyri bretska búskapin, har vøksturin er væl størri enn áður mett. Í Japan er

vøksturin væl størri enn í evrulondunum, og í Kina eru tiltøk sett í verk fyri at tálma búskaparliga brávøkstrinum.

***Vøksturin verður eisini størri í norðurlondum í 2005***

Útlitini fyri búskaparligu gongdini í norðurlondum eru eisini bjartari fyri 2004 og 2005, sí talvu 3.1. Vøksturin verður størri og arbeiðsloysi minkar, men inflasjónin kann framvegis koma at vera ein trupulleiki. Inflasjónin hevur verið í hægra lagi í nøkrum norðurlondum seinastu árini.

*Talva 3.1: Búskaparliga gongdin í norðurlondum (%).*

| | Vøkstur í BTÚ | | | Inflasjón | | | Arbeiðsloysi | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2003 | 2004 | 2005 | 2003 | 2004 | 2005 | 2003 | 2004 | 2005 |
| Danmørk | 0,4 | 2,1 | 2,4 | 2,1 | 1,8 | 1,7 | 5,9 | 6,0 | 5,5 |
| Finnland | 1,9 | 2,5 | 2,8 | 0,9 | 0,5 | 1,8 | 9,0 | 8,8 | 8,5 |
| Ísland | 4,0 | 4,5 | 5,0 | 2,1 | 2,5 | 3,0 | 3,4 | 3,0 | 2,8 |
| Noreg | 0,7 | 3,2 | 3,1 | 2,5 | 0,5 | 2,0 | 4,5 | 4,3 | 4,1 |
| Svøríki | 1,6 | 2,5 | 2,6 | 1,4 | 0,6 | 2,1 | 4,9 | 5,5 | 5,3 |
| *Norðurlond* | *1,2* | *2,6* | *2,7* | *1,7* | *0,9* | *1,9* | *6,0* | *5,9* | *5,7* |

*Kelda: MR-Finans, mai 2004.*

***Gongdin og útlitini í Danmørk***

Danski búskapurin var í 2003 merktur av lítlum virksemi, har lítil og eingin vøkstur var í innlendska eftirspurninginum og í útflutninginum. Eitt beinleiðis fall var eisini í íløgunum. Nú er vend komin í. Privata nýtlsan veksur og framtíðarvónirnar eru bjartari. Tann sokallaði "várpakkin"[1] hjá donsku stjórnini hevur havt sína ávirkan á gongdina. Útflutningurin veksur, arbeiðsloysið minkar og inflasjónin er fallin meira enn mett varð framanundan.

***Gongdin í finska búskapinum***

Í 2003 stavaði vøksturin í finska búskapinum frá privatari nýtslu og almennum íløgum, meðan privatu íløgurnar minkaðu. Í ár hevur vøksturin ikki verið so stórur, men mett verður, at framgongdin í altjóða búskapinum vil økja finska útflutningin. Vøksturin verður annars grundaður á økta privata nýtslu, sum stavar frá skattalættum og lágari inflasjón. Mett verður, at íløgurnar fara at økjast, men eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi fer at minka.

***Gongdin í íslendska búskapinum***

Í Íslandi var vøksturin í búskapinum í 2003 væl størri enn mett varð frammanundan. Mett verður, at vøksturin verður enn størri í 2004 og 2005. Vøksturin er grundaður á vaksandi vinnulívsíløgur, serstakliga ein nýggj aluminiumsverksmiðja, og vaksandi privatari nýtslu. Hetta fer at hava við sær stórt hall á íslendska gjaldsjavnanum.

[1] "Várpakkin" hjá donsku stjórnini er ein pakki við ekspansivum fíggjarpolitiskum tiltøkum. Í pakkanum eru m.a. skattalættar, inngjøld til tvungna samansparing verða fyribils sett úr gildi, alment byggjarí og aðrar almennar íløgur verða øktar, fleiri eftirútbúgvingar og aðrar útbúgvingar verða settar í verk og ymiskt annað.

***Gongdin í norska búskapinum***

Støðan í norska búskapinum er eisini betri nú, við lágari rentu og betri altjóða fortreytum. Vøksturin fer at økjast í 2004 og 2005. Mett verður, at arbeiðsloysið fer at minka spakuliga, og at lønarvøksturin verður minni enn hjá kappingarneytunum. Inflasjónin er lítil í ár, men fer at vaksa aftur í 2005.

***Gongdin í svenska búskapinum***

Í Svøríki heldur búskaparvøksturin fram. Mett verður, at útlendski eftirspurningurin og vinnulívsíløgurnar fara at økjast og stimbra vøksturin í svenska búskapinum enn meira. Við lágari rentu og høgum eftirspurningi eru fortreytirnar fyri øktum íløgum eisini góðar. Privata nýtlsan veksur framvegis, men eftispurningurin eftir arbeiðsmegi minkar. Lønarvøksurin er tí lítil. Inflasjónin hevur verið niðanfyri null, men er nú omanfyri aftur.

***Samanumtikið vøkstur, men vandin fyri at langa rentan hækkar er til staðar***

Samanumtikið er framgongd í altjóða búskapinum. Týdningarmesti váðin fyri framgongdini í altjóða búskapinum er vandin fyri at langa rentan fer at hækka. Stóri fíggjartørvurin av ovurstóra hallinum á fíggjarlógini og gjaldsjavnanum í USA kann føra við sær, at langa rentan hækkar, og gjaldoyrakursirnir tillaga seg samsvarandi. Hetta kann fáa tálmandi ávirkan á evropeiska búskapin.

### *3.2 Føroyski búskapurin í altjóða høpi*

***Gongdin í kostnaðarstøðinum týdning fyri føroyska útflutningin***

Nógv tann størsti parturin av føroyska útflutninginum er matvørur og rávørur til matvøruídnaðin. Gongdin í kostnaðarstøðinum í Føroyum samanborið við føroysku kappingarneytarnar ávirkar eftirspurningin eftir føroysku vørunum. Prísurin á matvørum verður annars ikki so nógv ávirkaðar av altjóða konjunkturunum.

***Náttúruviðurskifti og útboð stóra ávirkan á føroyska útflutningin***

Harafturímóti hava náttúruviðurskifti og útboð ógvuliga stóra ávirkan á prísin á matvørum og matvørurávørum. Fiskastovnar og útboðið av fiski á altjóða marknaðinum hava tí størri ávirkan á føroyska útflutningin enn altjóða konjunkturarnir.

***Umhvørvisfelagsskapir hava eisini stóran týdning fyri eftirspurningin eftir fiski***

Umhvørvisfelagsskapir hava eisini týðandi ávirkan á eftirspurningin eftir fiski. Stóra orðaskiftið seinastu árini um niðurfiskaður fiskastovnar hevur ført við sær, at eftirspurningurin eftir fiski er fallin. Vanligi brúkarin hevur í nógvum førum fingið eina skeiva fatan av veruleikanum og kennir seg sekan í týning av fiskastovnunum, um hann etur fisk.

***Týdningurin av ávirkanini frá umhvørvisfelagsskapunum skal takast í álvara***

Týdningurin av ávirkanini frá umhvørvisfelagsskapunum á føroyska fiskaútflutningin skal ikki undirmetast. At sannføra fiskakeyparar um, at føroyska fiskiveiðan er burðardygg, og at føroyingar taka umhvørvisatlit, fer frameftir at hava stóran týdning.

***Rentuhækking eisini ein vandi fyri føroyska búskapin***

Vandin fyri altjóða rentuhækkingum og inflasjón er eisini ein váði fyri gongdina í føroyska búskapinum, tí tað verður dýrari at liva í Føroyum og at reka tað føroyska samfelagið, um rentan og inflasjónin hækka. Føroyingar flyta inn næstan allar nýstluvørur, sum verða dýrari, um inflasjónin hækkar, har vørurnar verða keyptar.

*Mynd 3.1: Listaprísurin á gassolju primo hvønn mánað, 2000-2004.*




*Kelda: Statoil.*

***Oljuprísurin hækkar, men er framvegis lægri enn í 2000***

Í Føroyum er listaprísurin[2] á gassolju hækkaður seinastu mánaðirnar, men hann er framvegis lægri, enn hann var í 2000, sí mynd 3.1. Listaprísurin á gassolju var 3,13 kr. fyri liturin 1. november 2000 og 1. september 2004 var hann 2,75 kr. fyri liturin. Prísurin hækkaði framvegis í september, og 27. september 2004 var hann 2,89 kr. fyri liturin.

***Gjaldoyraviðurskifti og lønarvøkstur ávirka føroyska útflutningin***

Størsti parturin av føroyska útflutninginum fer á evropeiska marknaðin. Tí eru gjaldoyraviðurskiftini rættiliga støðug, hvat føroyskum útflutningi viðvíkur. Kappingarstøðan er tó versnað ímóti teimum fiskaútflytarum, sum selja í amerikanskum dollarum. Lægri lønarvøkstur og aðrir fyrimunir hjá føroysku kappingarneytunum hava eisini negativ árin á føroysku kappingarstøðuna.

***ES-víðkan stóran týdning fyri føroyskan fiskaútflutning***

1. mai í ár varð ES víðkað við tíggju londum, sum fara at hava stóran týdning fyri føroyskan fiskaútflutning. Tað eru serliga Pólland, Estland, Letland og Litava, har tað tilsamans arbeiða umleið 66.000 fólk í fiskivinnuni, sum koma at hava týdning fyri føroysku fiskivinnuna.

---

[2] Listaprísurin er prísurin, áðrenn avgjøld eru roknað.

***Nýggju limalondini í ES hava gott kappingarføri at virka fisk***

Felags fyri Pólland og tey trý baltisku londini er, at virðið á fiskaútflutninginum er størri enn virðið á fiskainnflutninginum. Størsti parturin av innflutta fiskinum verður virkaður og fluttur út aftur til tey ríkaru ES londini. Lága kostnaðarstøðið í londunum gevur teimum gott kappingarføri til at virka fiskavørur.

***Nýggju ES-londini fáa fría atgongd til marknað og stuðul***

Sum ES lond koma hesi londini at hava fría marknaðaratgongd fyri allar vørur eisini meirvirkaðar triðjalandsvørur. Tey koma eisini at fáa beinleiðis atgongd til allar stuðulsskipanir í fiskivinnupolitikkinum í ES. Nógvastaðni í hesum londunum er stórt arbeiðsloysi, og ynskir eru um at varðveita arbeiðspláss í fiskivinnuni.

***Føroyski útflutningurin av óviðgjørdum fiski kann tí fara at økjast***

Mett verður, at trýstið at keypa vørur úr norðurlondum til virkingar í hesum nýggju ES-londunum kemur at økjast munandi frameftir. Føroyar hava fría atgongd við rávørum á ES-marknaðinum, men tollur og innflutningsloft er á góðskaðum vørum. Hetta kann fara at stimbra føroyska útflutningin av óviðgjørdum fiski enn meira.

***Russiski marknaðurin kann fara at fáa týdning fyri føroyska útflutningin***

Í Noreg hava tey stórar vónir um ein nýggjan handilssáttmála við Russland, har tollurin á norskum fiski til Russlands fellur úr 15-20% niður í 3%. Hetta hevur serliga stóran týdning fyri norska laksa- og sílaútflutningin til Russland, sum veksur nógv í løtuni. Tí hevur tað eisini týdning fyri Føroyar at fáa handilssáttmála við Russland.

## 4. Føroyski búskapurin

### *4.1 Gongdin í bruttotjóðarúrtøkuni*

***Stóri vøksturin í føroyska búskapinum er vendur***

Stóri vøksturin í føroyska búskapinum, sum byrjaði miðskeiðis í 1990-árunum, minkaði og vendi til eina afturgongd í fjør. Føroyska bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) verður í løtuni mett at liggja um 10 mia. kr. í leypandi prísum.

*Talva 4.1: Føroyska bruttotjóðarúrtøkan 1998-2002.*

| *Mió. kr.* | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ, ársins prísir | 7.118 | 7.761 | 8.440 | 9.654 | 10.182 |
| Vøkstur í BTÚ í ársins prísum (%) | 8,7 | 9,0 | 8,7 | 14,4 | 5,5 |

*Kelda: Hagstova Føroya og Landsbanki Føroya..*

***Føroyska bruttotjóðarúrtøkan ikki gott mát fyri búskapargongdini***

Búskaparliga gongdin verður vanliga lýst við at vísa gongdina í bruttotjóðarúrtøkuni, men av tí at føroyska bruttotjóðarúrtøkan ikki er gjørd upp í føstum prísum, er gongdin í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni ikki serliga nýtiligt mát til at vísa gongdina í búskapinum.

***Lønargjaldingarnar geva góða ábending um búskapargongdina***

Tað finnast harafturímóti sera góðar og dagførdar skrásetingar av lønarútgjaldingum í Føroyum. Lønarútgjaldingarnar svara til yvir helmingin av BTÚ, og gongdin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina geva tí eina góða ábending um gongdina í virkseminum í føroyska búskapinum, sí mynd 4.1.

*Mynd 4.1: A-inntøka, 1995-2004.*



***Vøksturin í lønarút-gjaldingunum er nú helvtina av tí, hann hevur verið***

Tað er framvegis vøkstur í samlaðu lønarútgjaldingunum í Føroyum. Fyrstu 8 mánaðirnar í ár var vøksturin í lønarútgjaldingunum 3,1% samanborið við somu tíð í fjør. Hesin vøksturin er helvtina av miðal-vøkstrinum fyrstu 8 mánaðirnar frá 1995 til 2004, sum var 6,2%.

### *4.2 Gongdin í fiskivinnuni*

***Í fiskiflotanum er gongdin ymisk***

Støðan í fiskiflotanum er ymisk. Tað gongur væl hjá pelagisku skipunum og flakatrolarunum, meðan tað gongur afturá hjá heima-flotanum. Hetta kemst av vánaligum prísi og smáum fiski. Feløgini, sum eiga heimaflotan, eru tó væl konsoliderað. Viðvíkjandi rækju-vinnuni er støðan sera vánalig.

***Kappingarførið í fiskivinnuni munandi versnað***

Kappingarførið í føroysku fiskaframleiðsluni á landi hevur verið støðugt fallandi seinastu árini. Hetta kemst av styrktu krónuni og tí at vøksturin í framleiðslukostnaðinum hevur verið nógv størri í Føroyum enn hjá føroysku kappingarneytunum.

***Fiskavirkir steingja partar av árinum***

Fleiri virkir leggja stilt partar av árinum, og arbeiðið á flakavirkjun-um er tí ikki so støðugt nú, sum tað hevur verið tey seinastu árini. Hetta sæst aftur í tølunum úr fiskavirkisskipanini hjá ALS. Í ár hava 3 ferðir fleiri fólk fingið stuðul úr skipanini, samanborið við 3 tey seinastu árini.

***Tey minst lønartungu virkini betri fyri***

Tað eru serliga tey stóru virkini, sum hava hall. Tað gongur betri við teimum smærru virkjunum og teimum, sum flyta út heilan fisk. Støðan er sostatt betur hjá teimum minst lønartungu virkjunum.

***Fiskaútflutningurin minni í ár enn í fjør***

Fyrstu 6 mániðarnar í ár[3] minkaði føroyska fiskaútflutningsvirðið 4%, meðan nøgdirnar minkaðu 26%, sí talvu 4.2. Hetta er ein afturgongd í fiskaútflutninginum, men samanlagt kann tó sigast, at gongdin er sunnari enn gongdin fyrstu 6 mánaðirnar í 2003 samanborið við somu tíð í 2002.

***Lutfallið millum nøgd og virði er tó betri í ár***

Fyrstu 6 mánaðirnar í 2003 fall útflutningsvirðið á fiski 11%, meðan útflutningsnøgdirnar vuksu 28%. Hetta er sera óheppið, tí hetta merkir, at tað fæst nógv minni fyri útfluttu nøgdirnar. Halda tølini fyri í ár, so er óhepna gongdin vend, tí minkingin í nøgd er fleiri ferðir størri enn minkingin í virði. At tað er so stórur munur á virðisminkingini og nøgdarminkingini í ár kemst av, at tað í høvuðsheitinum eru bíligar vørur sum ídnaðarfiskur, sum gera munin.

[3] Tølini fyri fyrstu 6 mánaðirnar í ár skulu takast við stórum fyrivarni.

*Talva 4.2: Føroyski fiskaútflutningurin í virði og nøgd.*

| *Virði* | Januar –juni | | | %-broyting |
|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **2002** | **2003** | **2004** | **2003-04** |
| Toskur | 516,8 | 513,4 | 519,0 | 1 |
| Hýsa | 198,1 | 183,6 | 168,8 | -8 |
| Upsi | 213,2 | 170,0 | 119,2 | -30 |
| Laksur | 442,4 | 313,9 | 354,5 | 13 |
| Síl | 57,1 | 97,1 | 33,2 | -66 |
| Svartkjaftur | 51,3 | 69,9 | 28,9 | -59 |
| Sild | 42,5 | 9,7 | 1,9 | -80 |
| Makrelur | 37,1 | 16,4 | 6,4 | -61 |
| Rækjur | 120,6 | 115,1 | 83,9 | -27 |
| Onnur fiskasløg | 387,0 | 357,5 | 453,9 | 27 |
| **Virðið á fiskaútflutningi tils.** | **2066,1** | **1846,6** | **1769,7** | **-4** |

| *Nøgd* | Januar –juni | | | %-broyting |
|---|---|---|---|---|
| *Tons* | **2002** | **2003** | **2004** | **2003-04** |
| Toskur | 16.723 | 15.713 | 16.301 | 4 |
| Hýsa | 8.300 | 11.013 | 10.070 | -9 |
| Upsi | 16.225 | 15.630 | 11.669 | -25 |
| Laksur | 20.184 | 13.239 | 16.281 | 23 |
| Síl | 3.813 | 4.890 | 1.641 | -66 |
| Svartkjaftur | 12.874 | 75.391 | 26.404 | -65 |
| Sild | 11.465 | 6.284 | 954 | -85 |
| Makrelur | 5.717 | 2.482 | 1.072 | -57 |
| Rækjur | 4.704 | 4.611 | 2.788 | -40 |
| Onnur fiskasløg | 86.511 | 89.209 | 88.814 | 0 |
| **Virðið á fiskaútflutningi tils.** | **186.516** | **238.462** | **175.994** | **-26** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

***Prísirnir á fiski fara neyvan longur niður***

Tað er torført at siga nakað um prísútlitini á fiski í 2005, men tað eru ongar ábendingar um, at prísirnir fara at lækka enn meira. Prísurin á laksi og rækjum er t.d. so lágur, at tað er torført at ímynda sær, at hann kann vera lægri enn nú.

### *4.3 Gongdin í alivinnuni*

***Einki smolt verður væntandi sett á sjógv í ár***

Tað hevur gingið skjótt áfturá við alivinnuni seinastu árini. Útsetingin av smolti vaks úr 13 mió. upp í 18 mió. smolt frá 1998 til 2002. Í 2003 vórðu 7,5 mió. smolt sett á sjógv og í ár verður væntandi einki smolt sett á sjógv.

***Laksaframleiðslan minkar skjótt***

Tøkan av laksi var størst í 2001, tá ið hon var 41.000 tons í kruvdari vekt. Tøkan lækkaði niður í 37.000 tons í 2002 og hevur ligið á sama støði í 2003 og í ár. Næsta ár verður tað tikið, sum er eftir í ringunum, og tá verður tøkan umleið helvtina av tí, hon hevur verið seinastu árini. Verður einki smolt sett á sjógv í ár, verður eingin laksaframleiðsla í 2006.

***Sílaframleiðslan vaks nógv í 2002, men er nú minkað aftur***

Tøkan av sílum lá um 1.000 tons um árið fram til 2001, men í 2002 og 2003 vaks tøkan upp í umleið 8.000 tons. Orsøkin er, at prísirnir á sílum hækkaðu í Japan, og at síl fáa ikki ILA-sjúkuna. Fleiri alarar løgdu tí framleiðsluna um og fóru at ala síl ístaðin fyri laks. Hetta varð eisini gjørt í Noreg, og tí fullu prísirnir aftur. Alararnir fóru tí aftur at framleiða laks. Tøkan av sílum liggur nú um 3.000 tons.

***Stórur niðurskurður í føroyska útflutnings-virðinum***

Útflutningsvirðið á alifiski lá um 900 mió. kr. frá 1999 til 2003. Virðið hevur verið rættiliga støðugt hetta tíðarskeiðið, tí virðið á sílum er hækkað, meðan virðið á laksi er minkað. Í ár hevur útflutningsvirðið á alifiski verið nakað minni, og tað fer at minka burtur í einki næstu 2 árini. Hetta verður ein rættiliga stórur niðurskurður í føroyska útflutningsvirðinum.

***Vánalig útlit fyri alivinnuna***

Útlitini fyri alivinnuna eru vánalig. ILA ger um seg, og nýggj útbrot eru komin seinastu tíðina. Líkt er til, at tað verður møguligt at vaksinera komandi vár, men treytirnar fyri avtøku av fiski verða samstundis munandi herdar. Ivasamt er tí, um nakar vil seta nýggjan kapital í alifeløg og tilsvarandi fíggja raksturin.

***Nógv arbeiðspáss fara at hvørva í alivinnuni næstu 2 árini***

Umleið 780 fólk hava arbeitt beinleiðis í alivinnuni. Herafturat koma fleiri arbeiðspláss í hjávinnum. Tilsamans kann væntast, at ein stórur partur av arbeiðsplássunum bæði í alivinnuni og hjávinnunum fara at hvørva næsta 2 árini.

### *4.4 Gongdin í virkseminum annars*

***Í 2003 var lønarvøksturin mestur í almenna tænastuvirkseminum***

Gongdin í virkseminum í Føroyum kann verða lýst við at bera saman løngjaldingarnar í framleiðsluvinnunum, privatu vinnunum á landi og almennu tænastunum. Í 2003 var vøksturin mestur í almennu tænastunum, har løngjaldingarnar vuksu 8,0%. Harnæst kom privata byggi- og tænastuvirksemið á landi, har løngjaldingarnar vuksu 2,7%. Løngjaldingarnar í framleiðsluvinnunum minkaðu 8,3%, sí talvu 4.3.

***Gongdin tann sama fyrstu 7 mánaðirnar í ár***

Gongdin hevur verið tann sama fyrstu 7 mánaðirnar í ár, har vøksturin framvegis hevur verið størstur í almennu tænastunum og privata byggi- og tænastuvirkseminum á landi, meðan afturgongd hevur verið í framleiðsluvinnunum. Vøksturin hevur tó verið nakað størri og minkingin minni enn frá 2002 til 2003, sí talvu 4.3.

*Talva 4.3: Løngjaldingar eftir høvuðsbólkum.*

| *Mió. kr.* | **2002** | **2003** | **%** | **2003** *jan-juli* | **2004** *jan-juli* | **%** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvinnur | 1.994 | 1.829 | -8,3 | 1.022 | 978 | -4,3 |
| Priv. tænastur, bygging og samsk. | 2.029 | 2.083 | 2,7 | 1.181 | 1.234 | 4,5 |
| Almennar tænastur o.t. | 1.911 | 2.064 | 8,0 | 1.105 | 1.201 | 8,7 |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

***Gongdin í løngjaldingunum broytt seinastu árini***

Gongdin í løngjaldingunum í hesum 3 høvuðsbólkunum er nakað broytt seinastu árini. Í 2002 var framvegis vøkstur í løngjaldingunum í framleisðluvinnunum, men hetta vendi til eina stóra afturgongd í 2003, sum nú er minkað nakað aftur. Stórur vøkstur var í privatu byggi- og tænastuvinnunum á landi 2002, men hesin vøkstur er síðan nógv minkaður. Lønarvøksturin í almennu tænastunum hevur verið rættiliga støðugur hesi árini.

***Serliga maskin- og elektronikktænastuvirksemi merkt afturgongdina***

Stóra afturgongdin í alivinnuni og minkingin innan flakavinnuna merkist týðiliga hjá undirveitarum hjá hesum vinnum, serliga innan maskin- og elektronikktænastuvirksemi. Tað hevur eisini ávirkan, at fleiri skip nú gera viðlíkahaldsarbeiði uttanlands.

***Restin av byggi- og tænastuvirkseminum eisini ávirkað***

Í byggivinnuni er privati eftirspurninguin minkaður, meðan verkætlanir hjá landi og kommunum gevur støðugt arbeiði. Bilasølan er minkað umleið 20% í ár, og sølan av øðrum dýrum brúkslutun er eisini minkað. Annars hevur handilsvinnan ikki merkt so nógv til afturgongdina.

### *4.5 Gongdin í nýtsluni*

***Serliga innflutningurin av bilum og flutningsførum minkaði í 2003***

Innflutningsvirðið var 38 mió. kr. ella 1% minni í 2003 enn í 2002, tá eru skip og rávørur til fiskavirkini ikki tikin við, sí talvu 4.4. Størsta minkingin var í innflutninginum av bilum og øðrum flutningstólum. Innflutningurin av tilfari til aðra framleisðlu og tilfari til byggivirki minkaði eisini nógv.

***Størsti vøksturin var í innflutninginum av brennievni í 2003***

Innflutningurin av brennievni, maskinum og aðrari útgerð var nakað størri í 2003 enn í 2002. Innflutningurin av fóðri og øðrum til hav- og landbúnaðin og innflutningurin til beinleiðis nýtslu var eitt vet størri í 2003 enn í 2002.

*Talva 4.4: Føroyski innflutningurin.*

| *Virði* *Mió. kr.* | **2002** | **2003** | **%** | **2003** *jan-juni* | **2004** *jan-juni* | **%** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Til hav- og landbúnað | 276 | 285 | 3 | 148 | 105 | -29 |
| Til byggivirki | 383 | 356 | -7 | 185 | 188 | 2 |
| Til aðra framleiðslu | 739 | 705 | -5 | 327 | 323 | -1 |
| Brennievni o.t. | 410 | 440 | 7 | 216 | 249 | 15 |
| Maskinur o.o. útgerð | 411 | 439 | 7 | 222 | 177 | -20 |
| Bilar o.o. flutningsakfør | 260 | 225 | -13 | 123 | 114 | -7 |
| Til beinleiðis nýtslu | 1.133 | 1.142 | 1 | 547 | 554 | 1 |
| **Tilsamans uttan skip o.t. og rávøru til fiskavirking** | **3.612** | **3.592** | **-1** | **1.768** | **1.710** | **-3** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

***Innflutningurin minkar framvegis***

Fyrstu 6 mánaðirnar í ár minkaði innflutningurin 3%, sí mynd 4.4. Tað eru serliga innflutningsvirðið á alifóðuri, maskinum, útgerð og øðrum tilfari til vinnuliga nýtslu, sum minkaðu. Í øðrum vørubólkum er meira innflutt, t.d. til byggivinnuna, til beinleiðis nýstlu og brennievni. Nakað av hesum er reinur prísvøkstur.

### *4.6 Gongdin í handilsjavna og uttanlandsskuld*

***Avlop er á handilsjavnanum***

Í 2003 vórðu 100 mió. kr. í avlopi á handilsjavnanum, tá ið skip og tílíkt ikki verða tald við. Í ár hevur gongdin verið, at innflutningurin er minkaður meira enn útflutningurin, tá ið skipini ikki verða tald við. Úrslitið á handilsjavnanum verður tí neyvan verri í ár enn í fjør.

***Føroyar hava nettoáogn uttanlands***

Føroyar eiga samanlagt 4,1 mia. kr. tilgóðar uttanlands. Tann privati sektorurin eigur umleið 6 mia. kr. tilgóðar, meðan tað almenna skyldar næstan 2 mia. kr. uttanlands.

### *4.7 Gongdin í inflasjónini*

***Føroyska inflasjónin er lág***

Føroyska inflasjónin er undir 1% og er sostatt av teimum lægstu í altjóða høpi. Brúkaraprísirnir hækkaðu í miðal 0,6% frá 1. til 2. ársfjórðing í ár. Tað eru serliga prísirnir á brenniolju og húsaleigu, sum eru hækkaðir.

### *4.8 Gongdin í fíggjarliga sektorinum*

***Peningastovnarnir sett nógv av ímóti tapi í alivinnuni***

Føroysku peningastovnarnir hava mist nógv og sett nógv av ímóti tapi í alivinnuni. Í 2003 vórðu 425 mió. kr. mistar og settar av ímóti tapi, har høvuðsparturin var í alivinnuni. Samlaða úrslitið hjá føroysku peningastovnunum vendi tí frá einum avlopi á 293 mió. kr. í 2002 til eitt hall á 100 mió. kr. í 2003, sí talvu 4.5. Í ár hevur tørvur ikki verið á fleiri avsetingum og úrslitið er tí vent aftur í ár.

*Talva 4.5: Samlaða úrslitið hjá føroysku peningastovnunum.*

| *Mió. kr.* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **jan.-juni 2004** |
|---|---|---|---|---|---|
| *Inntøkur:* | | | | | |
| Rentuinntøkur o.a. | 531,5 | 556,2 | 568,4 | 599,8 | 283,1 |
| Kursreguleringar | -5,1 | 19,9 | 50,2 | 18,2 | 81,6 |
| *Útreiðslur:* | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 266,6 | 272,2 | 301,9 | 293,5 | 156,6 |
| Tap og avsetingar | -154,0 | -5,7 | 23,3 | 424,5 | 95,4 |
| **Úrslit** | **413,8** | **309,6** | **293,4** | **-100,0** | **112,7** |

*Kelda: Danmarks Nationalbank.*

### *4.9 Gongdin í arbeiðsloysinum*

***Føroyska arbeiðsloysi er lítið***

Arbeiðsloysið er framvegis lítið. Føroyska arbeiðsloysið liggur um 4%, men tað er vaksandi. Í juni vóru 53% av teimum arbeiðsleysu kvinnur og 47% vóru menn. Landafrøðiliga er arbeiðsloysið rættiliga ójavnt býtt, sí talvu 4.6.

***Arbeiðsloysið nógv størst í Suðuroy***

Av teimum 878 fólkunum, sum vóru arbeiðsleys í juni í ár vóru 27% úr Suðuroy, men tað búgva bert 11% av Føroya fólki í Suðuroy. Arbeiðsloysið var lutfalsliga minni í Eysturoy og Norðoyggjum. 15% av teimum arbeiðsleysu vóru úr Eysturoynni og 10% vóru úr Norðoyggjum. 22% av Føroya fólki búgva í Eysturoynni og 13% búgva í Norðoyggjum. Í restini av landinum var býtið javnari. 31% av teimum arbeiðsleysu vóru t.d. úr Suðurstreymoy, har 39% av fólkunum búgva.

*Talva 4.6: Býtið av fólkatali og arbeiðsleysum í juni 2004.*

| **Øki** | **Arbeiðsleys %**<br>*878 fólk* | **Fólkatal %**<br>*48.311 fólk* |
|---|---|---|
| Eysturoy | 15 | 22 |
| Norðoyggjar | 10 | 13 |
| Sandoy | 3 | 3 |
| Streymoy | 8 | 7 |
| Suðuroy | 27 | 11 |
| Suðurstreymoy | 31 | 39 |
| Vágarnar | 6 | 6 |
| **Tilsamans** | **100** | **100** |

*Kelda: ALS og Hagstova Føroya.*

***Samansetingin av teimum arbeiðsleysu broytist***

Samansetingin av teimum, sum fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS er eisini við at broytast. Sambært ALS koma nú fleiri og fleiri væl skikkað fólk við góðari útbúgving í skipanina.

## 5. Búskaparpolitikkur og fíggjarlógaruppskotið 2005

### *5.1 Búskaparpolitikkurin 2005*

***Búskaparpolitiska høvuðsmálið er at stimbra virksemið***

Búskaparpolitiska høvuðsmálið við fíggjarlógaruppskotinum 2005 er at stimbra virksemið mest møguligt, nú stóri vøksturin í virkseminum seinastu árini er steðgaður. Tað verður ein stór politisk avbjóðing hjá samgonguni at røkka hesum málinum, tí at stimbra búskaparliga virksemið merkir vanliga, at landskassin skal økja sínar útreiðslur.

***Inntøkur landskassans eru minkaðar***

Minkandi virksemið í búskapinum, minni heildarveiting og skattalættar, ið samgongan hevur raðfest høgt, hava við sær, at inntøkur landskassans vera minni nú, enn tær hava verið.

***Útreiðslurnar økjast, men hallið minkast***

Landskassin skal sostatt økja sínar útreiðslur samstundis sum inntøkurnar minka. Hetta merkir vanliga størri hall, men í samgonguskjalinum er ásett, at málið er at fáa javnvág aftur á fíggjarlógina.

***Búskaparpolitisku málini seta stór krøv***

Um samgongan skal megna at fullføra sínar raðfestingar, verður sostatt neyðugt at gera ítøkilig inntriv við bygnaðarligum tillagingum og umraðfestingum, har nakrar játtanir verða skerdar við tí endamáli at hækka aðrar.

Samanumtikið eru búskaparpolitisku høvuðspunktini í fíggjarlógaruppskotinum 2005 soljóðandi:

- Virksemið verður stimbrað mest møguligt undir teimum avmarkingum, ið eru í samgonguskjalinum.
- Raðfestingarnar skulu virka serliga arbeiðsskapandi har í landinum, har arbeiðsloysið er størst.
- Eldra- og heilsuøkið verða raðfest høgt.
- Tillagingar og niðurraðfestingar verða gjørdar, har tær nerva vælferðarsamfelagið minst møguligt.
- Ymiskt virksemi verður lagt saman í størri eindir, soleiðis at tað verður effektivari og rationellari.
- Skattalættar verða framdir samstundis sum pensjónsskipanin verður gjørd betri.
- Hægri avgjøld verða løgd á tubbakk og sodavatn.

### *5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2005*

***Hallið verður nakað minni í 2005 enn í 2004***

Hallið hjá landskassanum verður 197 mió. kr. í 2005. Hetta er nakað minni enn í 2004, tá hallið verður mett til 204 mió. kr. Úrslitið er sostatt í samsvar við ásetingina í samgonguskjalinum um at fáa javnvág aftur á fíggjarlógina.

*Mynd 5.1: Avlop landskassans 1997-2005.*




*Viðm: Tølini fyri 2004 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2005 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.*

***Gjaldsførishallið verður 280 mió. kr. í 2005***

Landskassin skal harafturat rinda góðar 80 mió. kr. í avdráttum til danska ríkiskassan í 2005. Gjaldførishallið hjá landskassanum verður sostatt næstan 280 mió. kr. í 2005.

### 5.3 Gongdin í inntøkum landskassans

***Inntøkurnar í 2005 verða á leið tær somu sum í ár***

Inntøkur landskassans verða bólkaðar í 4 høvuðsbólkar, sí talvu 5.1. Samlaðu inntøkur landskassans verða 9% minni í 2005 enn tær vóru í 2001, tá ið tær vóru mestar. Mett verður, at inntøkur landskassans verða á leið tær somu í 2005 sum í ár. Tað eru fleiri orsøkir til, at inntøkur landskassans eru minkaðar seinastu árini.

*Talva 5.1: Inntøkur landskassans, 1999-2005.*

| *Mió. kr.* | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.234 | 1.310 | 1.567 | 1.675 | 1.581 | 1.497 | 1.497 |
| Avgjøld og tollur | 1.043 | 1.117 | 1.148 | 1.239 | 1.274 | 1.254 | 1.270 |
| Ymsar inntøkur | 117 | 89 | 90 | 58 | 81 | 35 | 64 |
| Heildarveiting o.t. | 945 | 973 | 995 | 629 | 632 | 630 | 630 |
| **Inntøkur tilsamans** | **3.339** | **3.489** | **3.800** | **3.601** | **3.568** | **3.416** | **3.461** |

*Viðm: Tølini fyri 2004 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2005 eru úr fíggjarlógaruppskotinum*

***Niðurskurðurin í heildar-veitingini er størsta minkingin í inntøkunum***

Høvuðsorsøkin til at samlaðu inntøkur landskassans verða minni í 2005 enn í 2001 er, at heildarveitingin minkaði 366 mió. kr. í 2002. Hinar orsøkirnar til, at inntøkurnar minka, eru skattalættar og minni virksemi í føroyska búskapinum.

***Skattainntøkurnar minka av skattalætta og minkandi virksemi***

Størsti parturin av inntøkum landskassans eru skattainntøkur. Skatta-inntøkurnar vuksu á hvørjum ári til 2002 og eru síðan minkaðar. Hetta kemst í høvuðsheitinum av, at skattalættar vórðu givnir fyri 52 mió. kr. í 2003, 71 mió. kr. í 2004 og ætlanin er at geva 60 mió. kr. í skattalætta í 2005. Minkandi virksemið í landinum hevur eisini havt sína ávirkan á, at skattainntøkurnar hjá landskassanum eru minkaðar.

***Avgjaldsinntøkurnar vaksa aftur í 2005 orsakað av nýggjum inntøkulógum***

Næst størsti parturin av inntøkum landskassans eru avgjøld og tollur. Avgjaldsinntøkurnar minkaðu í 2004, men vaksa aftur í 2005. Minkningin í 2004 kemur av minkandi virkseminum í landinum og vøksturin í 2005 stavar frá nýggjum avgjøldum fyri 35 mió. kr., sum ætlanin er at leggja á sodavatn og tubbakk.

***Úrslitið hjá Føroya Banka stóra ávirkan á ymsar inntøkur***

Undir ymsum inntøkum eru m.a. ymisk loyvisgjøld til landskassan, bøtur og útluting úr partafeløgum, sum landið eigur ella eigur í. Høvuðsorsøkin til at ymsar inntøkur minkaðu nógv í 2004 er vánaliga úrslitið hjá Føroya Banka í 2003. Úrslitið verður væntandi betur í ár, og tí verða inntøkurnar eisini hægri í 2005.

***Árligi miðalvøksturin í skattum og avgjøldum hevur verið stórur síðan miðskeiðis í 1990-árunum***

Stórur vøkstur hevur verið í skatta- og avgjaldsinntøkum landskassans frá 1995 til nú. Vøkstur var øll árini fram til 2002, men frá 2003 til í ár hevur tað verið ein minking, sí mynd 5.2, har 8 teir fyrstu mánaðirnir frá 1995 til 2004 eru samanbornir. Árligi miðalvøksturin alt tíðarskeiðið hevur verið 7,4%. Frá 1995 til 2002 var árligi miðalvøksturin 10%, og frá 2003 til 2004 var árliga minkingin 1,1%.

*Mynd 5.2: A-inntøka og inntøkur landskassans, 1995-2004.*




## *5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans*

***Vøksturin í útreiðslum landskassans verður nógv minni í 2005***

Útreiðslur landskassans vaksa øll árini frá 1999 til 2005, sí talvu 5.2. Árligi miðalvøksturin hetta tíðarskeiðið er 5%. Frá 1999 til 2003 var árligi miðalvøksturin 6,7% og frá 2003 til 2005 var hann 1,6%. Í fíggjarlógaruppskotinum 2005 vaksa útreiðslurnar 1,2%. Vøksturin í útreiðslunum er sostatt nógv minkaður.

*Talva 5.2: Útreiðslur landskassans, 1999-2005.*

| *Mió. kr. (netto)* | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 2.445 | 2.586 | 2.846 | 3.147 | 3.192 | 3.334 | 3.424 |
| Løguútreiðslur | 135 | 174 | 180 | 240 | 262 | 242 | 182 |
| Rentuútreiðslur | 156 | 126 | 76 | 24 | 91 | 39 | 51 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **2.736** | **2.886** | **3.102** | **3.411** | **3.545** | **3.615** | **3.657** |

*Viðm: Tølini fyri 2004 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2005 eru úr fíggjarlógaruppskotinum*

***Vøksturin í rakstrar-útreiðslunum minkar nógv í 2005***

Vøksturin í rakstrarútreiðslunum hevur verið 5,8% frá 1999 til 2005, men verður 2,7% í fíggjarlógaruppskotinum 2005. Vøksturin í rakstrarútreiðslunum verður sostatt nógv minni í 2005. Høvuðsorsøkin til, at rakstarútreiðslurnar vaksa 90 mió. kr. í 2005, er lønarvøkstur, hækkingar í lógarbundnum útreiðslum og raðfestingar.

***Løgurnar verða nógv meira arbeiðsskapandi í Føroyum í 2005***

Løguútreiðslurnar vaksa nógv frá 1999 til 2004, men minka aftur nógv í 2005. Hóast løguútreiðslurnar verða minni í 2005, verða næstan 95 mió. kr. fleiri brúktar til løgur í Føroyum í 2005 enn í 2004. Løgurnar verða sostatt nógv meira arbeiðsskapandi í Føroyum í 2005, enn tað tær hava verið árini frammanundan, tá ið stórur partur av løguútreiðslunum fór av landinum.[4]

***Rentuútreiðslurnar nógv minkaðar***

Rentuútreiðslur landskassans eru nógv minkaðar seinastu árini. Høvuðsorsøkin til hetta er, at skuldin hjá landskassanum er nógv minni nú, enn hon hevur verið.

***Nettorakstrarútreiðslur býttar á málsøki***

Talva 5.3 vísir nettorakstrarútreiðslur landskassans býttar á greinar frá 2002 til 2005. Tølini skulu takast við fyrivarni, tí í 2002 og 2003 eru tað tølini fyri løgmál (í 2002 sjálvstýrismál) og oljumál, sum eru løgd saman til innlendismál. Í 2003 eru tølini fyri familju- og heilsumál og almannamál løgd saman til almanna- og heilsumál.

*Talva 5.3: Nettorakstrarútreiðslur landskassans, 2002-2005.*

| *Mió. kr.* | | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 31,0 | 31,0 | 35,6 | 36,7 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 39,6 | 28,9 | 32,4 | 32,3 |
| § 3 | Fíggjarmál | 218,6 | 198,5 | 201,3 | 206,7 |
| § 5 | Fiskivinna | 146,7 | 149,7 | 155,3 | 163,1 |
| § 6 | Vinnumál | 376,1 | 345,8 | 380,2 | 288,5 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 633,4 | 665,0 | 689,6 | 714,1 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 1.663,8 | 1.728,9 | 1.814,6 | 1.891,5 |
| § 15 | Innlendismál | 37,4 | 44,3 | 25,0 | 91,4 |
| **Nettorakstrarútreiðslur tilsamans** | | **3.146,6** | **3.192,1** | **3.334** | **3.424,3** |

*Viðm: Tølini fyri 2004 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2005 eru úr fíggjarlógaruppskotinum. Tølini undir FL-2004 eru úr fíggjarlógini.. 2003 eru roknskapartøl.*

***Løgur býttar á málsøki***

Nærri frágreiðingar um broytingar á ymisku málsøkjunum finnast í frágreiðingunum frá einstøku landsstýrismonnunum í parti 6. Talva 5.4 vísir løgurnar frá 2002 til 2005 býttar á málsøki.

[4] Løgurnar í 2005 verða nærri viðgjørdar undir punkt 5.6.

*Talva 5.4: Løguútreiðslur landskassans, 2002-2005.*

| *Mió. kr.* | | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 22,5 | 11,6 | 2,5 | 10,0 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 2,4 | 2,1 | 2,5 | 2,5 |
| § 3 | Fíggjarmál | 0,6 | -0,1 | 1,5 | 1,5 |
| § 5 | Fiskivinna | 1,9 | 0,4 | - | 1,0 |
| § 6 | Vinnumál | 146,5 | 166,3 | 159,9 | 88,6 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 7,8 | 14,0 | 15,4 | 47,0 |
| § 8 | Almanna og heilsumál | 58,6 | 67,7 | 60,5 | 38,0 |
| § 15 | Innlendismál | - | - | - | -6,8 |
| **Løguútreiðslur tilsamans** | | **240,3** | **261,9** | **242,3** | **181,9** |

*Viðm: Tølini fyri 2004 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2005 eru úr fíggjarlógaruppskotinum. Tølini undir FL-2004 eru úr fíggjarlógini .2003 eru roknskapartøl.*

### 5.5 Gongdin í skuld landskassans

***Bruttoskuld landskassans 4,4 mia. kr.***

Bruttoskuld landskassans var 3,8 mia. kr. ultimo 2003. Í 2003 varð skuldin til danska ríkiskassan umfíggjað, soleiðis at hon varð minkað 1,7 mia. kr. og er nú 2,2 mia. kr.[5] Umfíggingin varð gjørd soleiðis, at 0,5 mia. kr. vórðu goldnar av innistandandi í Landsbanka Føroya og 1,2 mia. kr. vórðu útskrivaðar í lánsbrøvum.

***Hóast gott gjaldføri kann gerast neyðugt at taka lán***

Lógin krevur, at innlánið hjá landskassanum í Landsbanka Føroya skal vera 15% av BTÚ. Í juli í ár var innlánið umleið 1,5 mia. kr. ella umleið 11 mió. kr. omanfyri minstakravið. Hóast landskassin hevur gott gjaldføri, kann tað tí gerast neyðugt at taka lán.

***Landskassin hevur eisini stóra fíggjarogn***

Landskassin hevur herumframt stóra fíggjarogn standandi í landsstovnum, landsfyritøkum og partafeløgum, sum ætlanin er at selja og samstundis niðurskriva skuld hjá landskassanum.

### 5.6 Løgur 2005

***Bruttoløgurnar í 2005 verða 270 mió. kr.***

Í 2004 verða ætlandi gjørdar løgur fyri 270 mió. kr. brutto. Í fíggjarlógaruppskotinum 2005 er løgukarmurin 219 mió. kr. brutto. Nettoløguútreiðslurnar verða 182 mió. kr. tí ætlanin er at selja íbúðarbygningar við Landssjúkrahúsið fyri 30 mió. kr. og gamla Smyril fyri umleið 7 mió. kr., sí talvu 5.5.

***Í 2004 eru 114 mió. kr. av løgunum virksemisskapandi í Føroyum***

Ein stórur partur av løgukarminum er seinastu árini farin av landinum, og hesin parturin hevur tí ikki skapt virksemi í Føroyum. Í 2004 fara 115 mió. kr. til nýggja Smyril, sum verður bygdur í Spaniu og 41 mió. kr. fara til medicoteknisk tól. Í 2004 eru tað bert 114 mió. kr. ella minni enn helvtin at tí samlaða løgukarminum, sum eru virksemisskapandi í Føroyum.

---

[5] Av hesum 2,2 mia. kr. standa 500 mió. kr. sum rentu- og avdráttarfrítt lán, ið verður avskrivað í 2018 um eingin oljuvinna tá er byrjað í Føroyum. Restin av skuldini er eitt annuitetslán, sum verður afturgoldið yvir 20 ár til eina fasta rentu á 5% p.a.

*Talva 5.5: Løguætlanin fyri 2005 (1.000 kr.)*

| | | |
|---|---|---|
| § 1 | **Løgtingið** | **10.000** |
| | Løgtingshús | 10.000 |
| § 2 | **Løgmansfyrisitingin o.a.** | **2.500** |
| | *Umbygging í Tinganesi* | *2.500* |
| § 3 | **Fíggjarmál o.a.** | **1.500** |
| | *Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík* | *1.500* |
| § 5 | **Fiskivinna** | **1.000** |
| | *Nýtt vaktarskip* | *600* |
| | *Trygdarmiðstøðin* | *400* |
| § 6 | **Vinnumál** | **88.600** |
| | *Granskingarlund* | *500* |
| | *Kanning av tunli til Viðareiðis* | *500* |
| | *Vegagerð í Kalsoy* | *1.500* |
| | *Liðugtgerð av tunlum á Kalsoynni* | *1.000* |
| | *Klaksvík-Norðoyri* | *500* |
| | *Norðoyartunnilsvegurin í Klaksvík* | *2.000* |
| | *Vegagerð í Leirvík, kanningar* | *1.000* |
| | *Toftir-Nes* | *1.100* |
| | *Skálabotnur-Strendur* | *10.000* |
| | *Trygging av Norðskálatunlinum* | *5.000* |
| | *Oyri-Norðskála* | *3.000* |
| | *Streymnes-Brúgvin við Streymin* | *3.000* |
| | *Oyrareingir-Signabø* | *2.000* |
| | *Bøur-Gásadalur* | *2.000* |
| | *Innkoyringarvegur til Tórshavn* | *10.000* |
| | *Skopunarfjørður, kanning av undirsjóvartunli* | *500* |
| | *Vegagerð við havnina í Skopun* | *2.000* |
| | *Tunnil til Dals, Fyrireikingar* | *1.000* |
| | *Samferðsluhavn í Suðuroy* | *3.000* |
| | *Øravík-Hov* | *33.000* |
| | *Tyrlupallar* | *1.000* |
| | *Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka* | *5.000* |
| § 7 | **Útbúgving og gransking** | **47.000** |
| | *Tekniski skúlin í Klaksvík* | *3.000* |
| | *Fiskivinnuskúlin í Vestmanna* | *5.000* |
| | *Skúladepilin við Marknagilsvegin* | *6.000* |
| | *Savnshús* | *500* |
| | *Føroya náttúrugripasavn* | *500* |
| | *Kirkjubømúrurin* | *1.000* |
| | *Almanna- og heilsuskúlin* | *1.000* |
| | *Miðnámsskúlin í Suðuroynni* | *23.000* |
| | *Skúlatilboð uttan fyri fólkaskúlaskipanina* | *500* |
| | *Bókasøvn* | *1.500* |
| | *Útvarp og sjónvarp, tøkni* | *5.000* |
| § 8 | **Almanna- og heilsumál** | **68.000** |
| | *Landssjúkrahúsið* | *35.000* |
| | *Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahús* | *2.000* |
| | *Tól, medicoteknisk* | *10.000* |
| | *Eldrasambýli* | *18.000* |
| | *Bústovnar* | *3.000* |
| | **Løgur tilsamans** | **218.600** |
| | | |
| § 8 | *Søla av íbúðarbygningum við Landssjúkrahúsið* | *-30.000* |
| § 15 | *Søla av gamla Smyrli* | *-6.750* |
| | **Løguútreiðslur tilsamans íroknað søla av løgum** | **181.850** |

.

***Í 2005 verða 209 mió. kr. av løgunum virksemisskapandi í Føroyum***

Í 2005 verða 209 mió. kr. av løgukarminum brúktar í Føroyum. Hóast samlaði løgukarmurin er minni í fíggjarlógaruppskotinum í 2005 enn í ár, verða næstan 95 mió. kr. fleiri brúktar til løgur í Føroyum.

***Løgukarmurin raðfestur landafrøðiliga***

Løgukarmurin er raðfestur soleiðis landafrøðiliga, at hann stimbrar virksemið mest, har arbeiðsloysið er størst. 84 mió. kr. av løgukarminum fara til landsvegir spjaddir um alt landið, herav fara 36 mió. kr. til Suðuroyar, umframt at nýggi miðnámsskúlin og almanna- og heilsuskúlin í Suðuroy fáa 24 mió. kr. av løgukarminum.

***Almanna- og heilsumál raðfest ovarlaga***

Heilsu- og almannamál eru eisini raðfest høgt. Sjúkrahúsini fáa 47 mió. kr. og 21 mió. kr. fara til eldrasambýli og bústovnar av løgukarminum í 2005.

***Nakrar løgur liggjar uttanfyri løgucætlanina í fíggjarlógaruppskotinum***

Herumframt liggur ein partur av løgunum hjá landinum uttan fyri løgukarmin í 2005, t.d. Norðoyartunnilin og løguvirksemið hjá apoteksverkinum, ið er ein landsfyritøka. Í 2005 vera løgurnar hjá Norðoyartunnlinum 120 mió. kr. og hjá apoteksverkinum 8 mió. kr.

## 6. Høvuðsraðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2005

Tinglimir og onnur hava í fleiri ár víst á, at viðgerðin av fíggjarlógar-uppskotinum í Løgtinginum er ov tilvildarlig og óskipað. Fíggjarmálaráðið hevur tikið hesar atfinningar til eftirtektar.

Fíggjarmálaráðið hevur mett, at orðaskiftið í Løgtinginum kann skipast betri, um hvør einstakur landsstýrismaður gevur eina skrivliga frágreiðing saman við fíggjarlógaruppskotinum, har viðkomandi landsstýrismaður í stuttum greiðir frá sínum høvuðsrað-festingum í fíggjarlógaruppskotinum.

Hvør einstakur landsstýrismaður fær soleiðis sjálvur høvi til at seta hol á viðgerðina av raðfestingunum innan sítt øki.

Á næstu síðunum eru frágreiðingar, sum Fíggjarmálaráðið hevur móttikið frá einstøku landsstýrismonnunum.

# Frágreiðingar frá einstøku landsstýrismonnunum

### *6.1 Raðfestingar undir § 2, Løgmansfyrisitingin*

Løgmaður hevur í samband við tillutaðan játtanarkarm fyri § 2 lagt dent á fylgjandi raðfestingar í uppskoti til fíggjarlóg fyri 2005:

**Sparingar innan miðfyrisintingina**
Útreiðslur til vørur og tænastur í 2005 verða lækkaðar við 231 tkr í mun til 2004. Talan er um niðurskur í smb. við ferðin. Somuleiðis verða útreiðslur til lønir á høvuðskontu 11.1.02 Løgmans-skrivstovan (rakstrarjáttan) minka við á leið 10% í mun til framskrivaðar lønir. Uppraðfesting av samskipanaruppgávum løgmans viðvíkjandi kunningarvirksemi hjá landsstýrinum er samstundis gjørd við setan av kunningarráðgeva í starv í Løgmansskrivstovuni. Í 2003 vóru 22 fulltíðarstørv í Løgmansskrivstovuni, sendistovurnar ikki íroknaðar, meðan talið í 2005 verður út við 19 fulltíðarstørv.

**Uppraðfesting av arbeiðinum hjá nevndini, ið ger uppskot til stjórnarskipan**
Við fyrra flaggdagsálitinum er nevndin komin væl áleiðis við setningi sínum. Enn eru tó stórar uppgávur hjá nevndini at loysa, og ynskir løgmaður at útvega nevndini hóskandi fíggjarkarm í 2005 og 2006, soleiðis at nevndin kann fullføra arbeiðið sítt. Játtanin til nevndina er at finna á høvuðs-kontu 11.1.40 og er í 2004 flutt av § 14 til § 2. Upprunaliga játtanin til nevndina í 2004 var 450 túsund krónur. Mælt verður til, at játtanin verður hækkað til 1,45 mió. kr í 2005.

**Raðfestingar viðvíkjandi sendistovunum**
Fingin er í lag avtala við danska Uttanríkismálaráðið um at lækka kostnaðin av føroysku sendistovunum í ES og London. Útreiðslur til hesar sendistovur, umframt sendistovuna í Keypmannahavn, vóru í 2003 út við 8,7 mió. kr. Í 2005 verður mett, at játtanartørvurin verður 7 mió. kr, hóast økt virksemi á sendistovu Føroya í Keypmannahavn og sendistovu Føroya í ES.

**Uppraðfesting av Menningarhjálp**
Sambært samgonguskjalinum skal orðast ein politikkur við greiðum málsetningum fyri menningar- og neyðhjálp, sum Føroyar lata øðrum londum. Løgmaður hevur í hesum viðfangi á vári 2004 latið tinginum frágreiðing, sum hevur verið til aðalorðaskiftis (løgtingsmál nr. 101-05/2003). Við støði í hesum verður arbeitt víðari við málinum, her undir at gera uppskot til reglur fyri at veita menningar- og neyðhjálp. Týðandi partur av hesum arbeiði er at leggja til rættis langtíðarætlanir, eins og gjørt verður í øðrum norðanlondum, har førleiki innan føroyska vinnu og fyrisiting kann koma menningarlandi til gagns.

Mælt verður til, at játtanin á høvuðskontu 13.3.01 Menningarhjálp (Onnur játtan) hækkar úr 300 tús. kr í 2004 til 3 mió. kr í 2005. Upphæddin fyri 2005 svarar til góð 0,03% av føroysku brutto-tjóðarúrtøkuni. Málið hjá ST er, at framkomnu londini lata menningarlondum hjálp svarandi til 0,7% av bruttotjóðarúrtøkuni.

### *6.2 Raðfestingar undir § 3, Fíggjarmál*

Tá fíggjarlógartilgongdin fyri 2005 byrjaði í mars mánað í ár, undirstrikaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í skrivi til løgmann og allar landsstýrismennn, at neyðugt var at fremja munagóð rationaliseringstiltøk í almenna sektorinum. Málið er ikki bert ein bíligari almennur sektorur, men ein almennur sektorur, ið kann geva borgarunum eina betri tænastu.

Niðanfyri verður greitt frá raðfestingum á økinum hjá landsstýrismanninum i fíggjarmálum, ið allar merkja rationaliseringar bæði á egnum øki og tvørgangandi í umsitingini og mótvegis borgarunum.

Orsakað av, at mett verður, at almenna umsitingin fer árliga at spara eina upphædd uppá í minsta lagi 4,5 mió. kr. í samband við at farið verður at ljóslesa rokningar, eru 1,5 mió. kr av hesi upphædd fluttar til Føroya Gjaldstovu til at menna og umsita nevndu skipan.

Toll- og Skattstova Føroya hevur fingið játtað góðar 600.000 krónur til KT menning.

Økið hjá landsstýrismaninum í fíggjarmálum er tað KT-tyngsta hjá føroysku umsitingini, og hevur menning av hesum øki eisini hægstu raðfesting, og er tí neyðugt á hvørjum ári at hava eina játtan standandi til víðari menning av verandi skipanum og til menning av nýggjum skipanum.

**Raðfestar KT-verkætlanir í 2005**

- Ljóslesing av rokningum og workflow. Ætlanin er eisini at seta fokus á at fáa skaptar fyritreytir fyri at talgilda rokningarsamskiftið millum virki og tað almenna.
- Útbygging av leiðslukunningarskipanini við einum lønarparti
- KT trygd
- At lønarseðlar verða sendir út í talgildum formi.
- Flyting av skattaskipanunum frá sonevndu DL1 datagrunni til DB2 datagrunnskipan.
- Liðugtgerð av tollautomatisering
- Sjálvgreiðsla av mvg og lønum
- Felags virkisskrá
- Skipan til skráseting av pensiónsrættindum

Omanfyrinevndu KT-raðfestingar verða fíggjaðar við:

- Omanfyrinevndu meirjáttanum
- Árligu játtanum til KT-menning
- Sparingum stavandi frá KT-útbygging
- Sparingum stavandi frá bygnaðarbroytingum

**Bygnaðarbroytingar**

Avgerð er tikin um at leggja Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya saman í ein stovn. Hetta verður gjørt fyri betur at kunna gagnýta arbeiðsorkuna á stovnunum.

Bygnaðurin á Toll- og Skattstovu Føroya verður eisini grundleggjandi broyttur. Økisskrivstovurnar, sum í dag eru 6 í tali verða lagdar saman til tríggjar. Uppgávubýtið millum økini verður eisini grundleggjandi broytt.

**Eingin kompensatión fyri sáttmálahækkingar**
Sáttmálahækkingar merkja, at almennu lønirnar hækka 3,4 %. Fíggjarmálaráðið og stovnarnir á grein 3 á fíggjarlógini fáa onga kompensatión fyri nevndu sáttmálahækking.

**Skattaviðurskifti**
Landsstýrismaðurin í fígjarmálum hevur eisini ábyrgdina av grein 20 á fíggjarlógini, ið fevnir um skattir og avgjøld. Raðfestingarnar á hesum øki eru viðgjørdar aðrastaðni í hesi frágreiðing.

### *6.3 Raðfestingar undir § 5, Fiskivinna*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur í samband við uppskot til fíggjarlóg fyri 2005 fingið tillutaðan karm uppá 164 mió kr., í mun til 155 mió í 2004. Talan er sostatt um eina øking uppá 9 mió kr. Talvan niðanfyri lýsir framskrivingar, sparingar og raðfestingar í samband við uppskot til fíggjarlóg fyri 2005 (í tkr.).

| | Fíggjarlóg 2004 | Framskriving | Sparing | Raðfesting | Fíggjarlóg 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan | 116.805 | 1.419 | -1.297 | 2.023 | 118.950 |
| Lógarbundin j. | 37.500 | 8.500 | -1.000 | 0 | 45.000 |
| Løgujáttan | 0 | 0 | 0 | 1.000 | 1.000 |
| Onnur játtan | 1.000 | -1.500 | -330 | 0 | -830 |
| Íalt § 5 | 155.305 | 8.419 | -2.627 | 3.023 | 164.120 |

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2005 hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum lagt dent á fylgjandi raðfestingar:

**Framskrivingar og sparingar av lógarbundnum útreiðslum**
Á fiskivinnuøkinum viga stuðulsjáttanir viðvíkjandi inntøkutrygdini hjá fiskimonnum tungt. Dagsins veruleiki er, at fiskaprísirnir eru lágir, og í løtuni eru eingi beinleiðis útlit til, at prísirnir fara at hækka munandi. Tískil er játtanin til inntøkutrygd hækkað við 8 mió kr., soleiðis at játtanin til inntøkutrygd verður mett til 33 mió kr.

Fyri at tryggja útjaðaranum javnbjóðis møguleikar at kappast um føroyska fiskin, verður játtanin til flutningsstuðul hækkað nakað í 2005. Arbeitt verður samstundis við at endurskoða lógargrundarlagið undir hesi játtan.

Arbeitt verður við at endurskoða lógina um telefonstuðul til langfarafiskimenn. Mett verður, at hetta kann gava nakað av sparing, og tí er henda stuðulsjáttan lækkað við 1 mió í 2005.

**Lønarsparingar innan miðfyrisintingina**
Lønarkarmurin á høvuðskonto 11.1.05, Fiskimálaráðið er netto lækkaður við á leið 4%. Sparingar eru gjørdar uppá 10%, eftir at hesar eru framskrivaðar, umframt at uppraðfestingar/flytingar eru gjørdar.

**Aðrar sparingar**
Har tað er gjørligt, eru sparingar gjørdar á “onnur játtan” við 10%. Somuleiðis eru útreiðslur til vørur og tænastur lækkaðar við góðum 400 tkr., svarandi til á leið 20% av ferðakostnaði uttanlands við 2003 sum grundarlag.

**Uppraðfesting av játtanini til Fiskivinnuráð og nevndir**
Játtanin er hækkað við 600 tkr., soleiðis at samlaða játtanin verður 1 mió kr. í 2005. Umframt lógarásettu nevndirnar og ráðini, eru tað serliga tvey arbeiði, sum ætlandi fara at fáa ágóðan av hesi øking:

1. nevnd er sett at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, og
2. arbeiðsbólkur er settur at kanna spurningin um fiskiorku í sambandi við áseting av fiskidøgum

Fyrra arbeiðið verður væntandi ikki liðugt fyrr enn um eini 2 ár. Arbeiðsbólkurin, sum kannar spurningin um fiskiorkuna, skal eftir ætlan hava lagt fram eina frágreiðing, áðrenn tilmælini um fiskidagar fyri fiskiárið 2005/2006 verða skrivað.

**Raðfestingar á løgujáttanum**

Landsstýrismaðurin hevur raðfest tvær løgujáttanir. Ætlanin er at gera skitsuprojekt til nýtt vaktarskip fyri Tjaldrið, sum verður 30 ár í 2005, og 600 tkr. eru settar av til endamálið í uppskotinum fyri 2005. At bøta um hølisumstøðurnar, sum Trygdarmiðstøðin hevur við Borðoyarvík, eru 400 tkr. settar av.

### *6.4 Raðfestingar undir § 6, Vinnumál*

**Rakstur**
Á fíggjarløgtingslógini fyri 2004 vórðu 380,2 mió kr. játtaðar til rakstur (netto), men eru Strandfaraskip landsins, og tilhoyrandi kontur, samanlagt 83,8 mió kr., síðan fluttar til Innlendismálaráðið (§ 15) í sjálvum fíggjarárinum, sum merkir, at veruligi rakstrarkarmurin er **296,4 mió kr. í 2004**.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur í fyrireikingum sínum til fíggjarlógaruppskotið fyri 2005 lagt stóran dent á, at raksturin ikki skal hækka og yvirhøvur at fremja sparingar. Biðið verður um eina játtan uppá **288,5 mió kr. í 2005**, sum er ein lækking uppá **7,9 mió kr**. frá 2004 til 2005.

**Lønir og annar rakstur:** Galdandi sáttmálar, sum Fíggjarmálaráðið/Lønardeildin hevur gjørt við yrkisfeløgini, merkir eina meirútreiðslu til stovnarnar uppá 3,4% ella 3,8 mió kr. Ein framskriving av øðrum rakstrarútreiðslur hjá stovnunum uppá 2%, sum svarar nøkulunda til inflatiónina, merkir eina meirútreiðslu uppá 1,2 mió kr. Hvørki lønir ella annar rakstur verður tó framskrivaður, sum merkir eina reella sparing uppá eini 5,0 mió kr. Rakstrarútreiðslurnar hækka **0 kr**.

**Fyrisitingarútreiðslur, vanligt virksemi**: Spart verður innan fyrisiting. Lønarjáttanin hjá Vinnumálaráðnum er lækkað, eins og hjá hinum ráðunum. Miðað verður eftir, at nakrir stovnar samskipa fyrisiting sína, og tessvegna spara fyrisitingarútreiðslur. Hesir eru 1) Ferðaráð Føroya, Menningarstovan og Vinnuframagrunnurin, 2) Arbeiðseftirlitið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan, og 3) Oljufyrisitingin og Jarðfrøðisavnið. Felags fyrisiting merkir eina sparing uppá 900 tús. kr. Fyrisitingarútreiðslur á høvuðskontu 6.37.1.07. Sáttmálaeftirlitið *(Rakstrarjáttan)*, verða lækkaðar við 200 tús. kr. Tað merkir eina samlaða sparing (lækking) uppá **1,6 mió kr**.

**KT- fyrisiting, verkætlan**: Ein KT- fyrisiting er stovnað í 2004. Næsta ár verða 1,75 mió kr. settar av til verkætlanir á undirkontu 6.38.3.19.40. Verkætlanir, sum m.a. skal nýtast til at fara undir ein felags KT- tænastudepil. Endamálið er at savna ymiskar KT- skipanir og vitan á einum staði, stýra KT- trygdini betri, og rationalisera raksturin. Meirkostnaður (hækking) **1,75 mió kr.**

**Stuðul til vinnu** (Onnur játtan): Spart verður innan vinnustuðul. Játtanin til høvuðskontu 6.36.1.04. Havbúnaðarroyndir, lækkar við 650 tús. kr. Høvuðskonta 6.37.2.02. Vinnuframagrunnurin, lækkar við 250 tús. kr. Høvuðskonta 6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð, lækkar við 200 tús. kr. vegna minni virksemi. Harumframt eru aðrar sparingar uppá 140 tús. kr. Stuðulin til landbúnaðin verður hinvegin ikki lækkaður. Samlað sparing (lækking) er **1,2 mió kr**.

**Búnaðarstovan**: Búnaðarstovan er skipað, sí høvuðskontu 6.33.2.03. Búnaðarstovan *(Rakstrarjáttan).* Hon skal umsita jørð landsins, landbúnaðarstuðul og aliloyvir. Búnaðargrunnurin fíggjar meginpartin av virkseminum, undantikið umsitingina av aliloyvum. Meirkostnaður (hækking) **0,4 mió kr**.

**Jarðfrøði og seismiskar kanningar**: Játtanin til kanningarvirksemi hjá Jarðfrøðisavninum, undirkonta 6.32.2.01.22. Vísindaligar kanningar, lækkar við 4,6 mió kr., tí tørvur er ikki á størri játtan í 2005. Inntøkur landskassans á høvuðskontu 6.32.1.04. Søla av seismiskum kanningarúrslitum (Onnur játtan), minkar við 5,85 mió kr., niður á 150 tús. kr., tí roknað verður við lítlari og ongari sølu í 2005. Nettoútreiðslur landskassans hækka sostatt við **1,3 mió kr**.

**Rúsdrekkasøla landsins**: Játtanin til høvuðskontu 6.38.1.02. Rúsdrekkasølu landsins *(Landsfyritøka)* hækkar við 600 tús. kr., m.a. grundað á stagneraða sølu. Hækking **0,6 mió kr**.

**Partabrøv, søla**: Landsstýrið hevur avgjørt, at selja landsins partabrøv í samtakinum Skipafelagið Føroyar. Sí høvuðskontu 6.37.6.11. Partabrøv, ymisk viðurskifti. Inntøkur landskassans verða leysliga mettar til **3,0 mió kr**.

**Landsverk og Norðoyatunnilin**: Um høvuðskontu 6.38.1.02. Landsverk *(Rakstrarjáttan)*. Eins og aðrir stovnar fær Landsverk ikki játtað sáttmálabundna lønarvøksturin uppá 1,43 mió kr. Harumframt skal stovnurin spara 500 tús. kr. Roknað verður eisini við at inntøkufíggjaða virksemi minkar, vegna minni virksemi, og kapping innan asfaltsverk. Høvuðskonta 6.38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum, lækkar við 400 tús. kr. Høvuðskonta 6.38.1.21. Stuðul til havnir, lækkar við 3,0 mió kr. (fellur burtur), tí málið um stuðul til Vágs havn er endaliga avgreitt. Hinvegin hækka viðlíkahaldsútreiðslurnar 290 tús. kr. Rakstrarútreiðslurnar hjá Landsverki lækka sostatt 3,6 mió kr.

Sum ásett í verklagslóg, verður peningur játtaður til høvuðskontu 6.38.2.19. Norðoyatunnilin (Onnur játtan), sum merkir eina meirútreiðslu (hækking) uppá 32,5 mió kr. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar til vegir, tunnlar og havnir hækka sostatt **28,9 mió kr**.

**Postverk Føroya:** Ætlanin er at umskipa Postverk Føroya til alment partafelag. Játtanin á høvuðskontu 6.38.3.01. Postverk Føroya *(Landsfyritøka)*, sum er til rakstur av postverkinum uppá 2,3 mió kr., verður tí strikað. Játtanin til høvuðskontu 6.38.3.02. Postverk Føroya, umskipað til partafelag *(Onnur játtan)*, uppá 30 mió kr. verður eisini strikað, tí málið eftir ætlan verður avgreitt í 2004. Hinvegin verður peningur, 2 mió kr. settur av á fíggjarlógini til eftirløn hjá ávísum starvsfólkum á postverkinum, á nýggjari høvuðskontu 6.38.3.08. Postverk Føroya, eftirlønir *(Lógarbundin játtan)*. Tað merkir eina samlaða lækking uppá **30,3 mió kr**.

**Flogferðsla**: Játtanin á høvuðskontu 6.38.2.10. Flogferðsla *(Lógarbundin játtan)*, 1,4 mió kr., sum er toll- og MVG endurgjald til SLV, verður strikað, tí roknað verður við eini loysn á flogvallarmálinum. Stovnað verður nýggj høvuðskonta 6.38.2.11. P/F Flogsamband, tí ætlanin er at avtaka felagið, ella at landsins partur av partapeninginum 3,6 mió kr. verður goldin landinum. Nettoútreiðslur landskassans lækka sostatt við **5,0 mió kr**.

**Semingsmannaskipanin**: Játtanin til høvuðskontu 6.39.1.01. Semingsmannaskipanin *(Rakstrarjáttan)* hækkar við 500 tús. kr., tí skipanin eftir ætlan skal fevna um fastan gerðarætt og semingsstovn fyri allan arbeiðsmarknaðin. Hækking **0,5 mió kr**.

**Barsilsskipanin**: Ávísar lógarbroytingar eru gjørdar, og ber tí til at lækka játtanina til høvuðskontu 6.39.4.01. Barsilsskipan *(Lógarbundin játtan)* við **0,8 mió kr**.

Nýtt rakstrarvirksemi er sum tilskilað omanfyri: A) Búnaðarstovan, B) Partabrøv, søla, C) P/F Flogsamband, avtøka, D) Postverk Føroya, eftirlønir, og E) KT- fyrisiting, verkætlanir.

**Løgur**
Á fíggjarlógini fyri 2004 vórðu 160 mió kr. (netto) játtaðar til íløgur, men er løgujáttanin hjá Strandfaraskipum landsins uppá 108,6 mió kr.(netto), flutt til Innlendismálaráðið í sjálvum fíggjaárinum, sum merkir, at veruligi játtanarkarmurin er 51,5 mió kr. í 2004. **Bruttojáttanin er tó 87,4 mió kr**. (rundað tal), tí ætlanin varð at selja bygningin hjá Postverkinum á Argjum, men verður

tað av ongum í 2004. Tí gevur tað eina betri mynd at samanbera bruttoíløgurnar fyri 2004 og 2005, og verður tað eisini gjørt í hesi frágreiðing og samandráttinum niðanfyri.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2005 lagt stóran dent á, at íløgurnar ikki skulu lækka, fyri at varðveita virksemið í samfelagnum. Biðið verður um eina játtan uppá **88,6 mió kr. í 2005**, sum er ein hækking av bruttoíløgunum uppá 1,2 mió kr. Sjálvt íløguvirkesmið í samfelagnum verður tí stórt sæð tað sama.

**Landsverk**
Meginparturin av íløgunum, **84,1 mió kr**., ella 95%, verða játtaðar á høvuðskontu 6.38.1.07. Nýggir landsvegir *(løgujáttan)* til 19 ymisk endamál kring landið. Størstu einstøku játtanirnar eru til hesi sjey endamál: 1) Tunnilsgerð millum Øravík- Hov: **33 mió kr**. 2) Vegagerðin Skálabotnur-Strendur: **10 mió kr**. 3) Innkoyringarvegur til Tórshavn: **10 mió kr**. 4) Trygging av Norðskálatunnlinum: **5 mió kr**. 5) Trygdartiltøk og størri ábøtur: **5 mió kr**. 6) Vegastrekkið Oyri-Norðskála: **3 mió kr**. og 7) vegastrekkið Streymnes- Brúgvin við Streymin: **3 mió kr**.

Játtanin til landsvegir hækkar samanlagt við góðum 51 mió kr. frá 2004 til 2005. Samstundis lækkar játtanin til høvuðskontu 6.38.1.14. Havnir *(Løgujáttan)*, við at kalla sama upphædd, ella 50,5 mió kr., frá 53,5 mió kr. til 3 mió kr., tí sjálv havnagerðin "Samferðsluhavn í Suðuroya" er liðug . Nú er bert farstøðin eftir, og verða **3 mió kr**. játtaðar til tað endamálið. Harumframt verður **1 mió kr**. játtað á høvuðskontu 6.38.2.13. Flogferðsla *(Løgujáttan)* til Tyrlupallin í Kirkju.

**Nýskipan og nýggjar kontur**
Arbeitt verður við at umskipa umsitingina av útvarps- og sjónvarpssendinetinum, tí verður ongin peningur játtaður til høvuðskontu 6.38.3.10. Útvarps- og sjónvarpssendinetið *(Løgujáttan)* í 2005.

Tvær nýggjar íløgukontur eru stovnaðar: 1) Høvuðskonta 6.33.2.11. Almenn jørð, søla *(Løgujáttan)*, sum heimilar Búnaðarstovuni at selja almenna jørð, sum er ein útreiðsluneutral játtan, og 2) høvuðskonta 6.37.5.06. Granskingarlund *(Løgujáttan)*, har **0,5 mió kr**. verða settar av til forkanningar o.t., nú tað møguliga verður farið undir at byggja eina granskingarlund.

**Samanumtikið**
Samanumtikið lækka rakstrarútreiðslurnar við **7,9 mió kr**. og bruttoíløgurnar hækka við **1,2 mió kr**. frá 2004 til 2005. Samlaði rakstrarkarmurin og bruttoíløgukarmurin fyri § 6. Vinnumál, lækkar sostatt við **6,7 mió kr**.

Rakstrar- + løgukarmur: Broyttar útreiðslur/raðfestingar, samandráttur

| **Virksemi** | Mió kr | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **A. Rakstrarkarmur 2004** | **296,4** | |
| **B. Broyttar útreiðslur/ raðfestingar** | **-8,4** | |
| 1. Lønir og annar rakstur | 0,0 | Ongin framskriving |
| 2. Fyrisitingarútreiðslur | -1,6 | Felags fyrisiting o.a. |
| 3. KT-fyrisiting, verkætlan | 1,8 | Samskipa KT- økið, KT- trygd o.t |
| 4. Stuðul til vinnu | -1,2 | Ymsar sparingar |
| 5. Búnaðarstovan | 0,4 | Nýggjur stovnur |
| 6. Jarðfrøði og seismiskar kanningar | 1,3 | Verkætlan. Lítlar inntøkur frá seismikki |
| 7. Rúsdrekkasøla landsins | 0,6 | Stagnerað søla o.t. |
| 8. Partabrøv | -3,0 | Søla av partabrøvum |
| 9. Landsverk og Norðoyatunnilin | 28,9 | Sparingar LV, Norðoyatunnilin 32,5 mió |
| 10. Postverk Føroya | -30,3 | Umskipað til partafelag. Eftirlønir |
| 11 Flogferðsla | -5,0 | Onki toll- endurgjald. Flogsamband avtikið. |
| 12. Semingsmannaskipanin | 0,5 | Gerðarætt + semingsstovn fyri øll |
| 13. Barsilsskipanin | -0,8 | Lógarbroytingar |
| **C. Aðrar hækkingar/lækkingar samanlagt** | **0,5** | Ymsar smáar broytingar |
| **Rakstrarkarmur fyri 2005** | **288,5** | A - B + C |
| | | |
| **Bruttoíløgur í 2004** | **87,4** | |
| **Íløgur og rakstur í 2004** | **383,8** | |
| | | |
| Bruttoíløgur í 2005 | **88,6** | Landsvegir 19 endamál: Øravík – Hov |
| **Íløgur og rakstur 2003** | **377,1** | Lækking 6,7 mió kr. |

### *6.5 Raðfestingar undir § 7, Útbúgving og gransking*

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur í sambandi við uppskot til fíggjarlóg fyri 2005 fingið tillutaðan fíggjarkarm upp á 761 mió kr. í mun til 705 mió kr. í 2004. Talan er sostatt um eina øking upp á 56 mió kr. Av hækkingini fara 24,4 mió kr. til rakstur, stuðul og lógarbundnar útreiðslur, meðan 31,6 mió kr. fara til løgur. Av teimum 24,4 mió kr. fara 15,8 mió kr. til lønarhækkingar til skúlaverkið. Talvan niðanfyri lýsir framskrivingar, sparingar og raðfestingar í sambandi við uppskot til fíggjarlóg fyri 2005 (í tkr.).

| | **Fíggjarlóg 2004** | **Framskrivingar** | **Sparingar** | **Raðfestingar** | **Fíggjarlóg 2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan | 541.766 | 19.284 | 9.571 | 6.485 | **557.964** |
| Lógarbundin játtan | 107.169 | 9.785 | 1.000 | | **115.954** |
| Løgujáttan | 15.400 | | | 31.600 | **47.000** |
| Onnur játtan | 40.638 | 198 | 695 | | **40.141** |
| **Tilsamans §7** | **704.973** | **29.267** | **11.266** | **38.085** | **761.059** |

**Framskrivingar av lógarbundnum útreiðslum**
Læraraeftirlønir eru hækkaðar við 4,3 mió kr. Orsøkin til hesa hækking er fyrst og fremst, at talið av lærarum, sum fáa eftirløn, hækkar, og at eftirlønin verður hækkað saman við lønarhækkingum á tí almenna arbeiðsmarknaðinum. Lestrarstudningurin er hækkaður við knøppum 4,3 mió kr. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at fleiri næmingar eru komnir í skipanina, og at lestrarstuðulin er hækkaður sambært prístalinum. Studningur til læarupláss og Ferðaendurgjald til læarupláss eru hinvegin lækkaðar við knøppum 300 tkr.

**Lønarsparingar innan miðfyrisitingina**
Lønarkarmurin á høvuðskontu 7.11.1.09, Mentamálaráðið, er lækkað 10%, eftir at lønarjáttanin fyri 2004 er hækkað við lønarframskriving upp á 3,4%, ella við knøppum 7%.

**Aðrar sparingar**
Har tað hevur latið seg gjørt, eru sparingar framdar á "aðrari játtan". Mentanarøkið er á nøkulunda sama stigið sum í 2004, hóast onkrar sparingar eisini eru framdar her. Útreiðslur til "vørur og tænastur" eru samlað lækkaðar við 520 tkr., svarandi til 20% av ferðakostnaði uttanlands við støði í roknskapartølunum fyri 2003. Játtanin til Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya er lækkað við 3,2 mió kr. Hetta kemst av, at næmingarnir nú fáa útbúgvingarstuðul í staðin fyri løn.

**Uppraðfestingar**
Farið verður undir fyrireikingar av OECD-mátingum og –kanningum fyri at sammeta okkara skúlaverk við eini 45 onnur framkomin lond. Til hetta arbeiði eru settar av 0,5 mió kr. Somuleiðis er ein hálv mió. sett av til at endurskoða miðnámsútbúgvingarnar. Til at styrkja enn meira um yrkisútbúgvingarskipanina eru 0,5 mió kr. settar av til nýggja útbúgving innan byggitøkni. Farið verður undir at fyrireika bygnaðarbroytingar á savnsøkinum til tess at styrkja stovnarnar fakliga eins og fyrisitingarliga. Almennu kringvørpini (Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya) verða løgd saman 1. januar 2005. Arbeiðið við at orða nýggja kringvarpslóg byrjar í næstum. Tónleikaøkið er raðfest, við at játtanin til Føroya Symfoniorkestur er økt við 200 tkr.

Arbeitt verður við at gera uppskot til heimildarlóg fyri stuðulsveitingar innan list, mentan, ítrótt og ungdómsarbeiði.

Í heyst verður ætlandi orðaskifti á tingi um stuðulin til ungdóms- og bygdahús, ítróttaranlegg, bygdasøvn og fólkabókasøvn. Við støði í orðaskiftinum fer landsstýrismaðurin at koma við uppskotum um, hvussu hetta øki eigur at verða skipað í framtíðini.

Landsstýrið hevur valt at raðfesta skúlabygging frammarlaga næstu árini soleiðis, at byggiætlanirnar kunnu fremjast í einari langtíðarløguætlan. Á hesum øki eru settar 23 mió kr. av til miðnámsskúlan í Suðuroynni, 1,0 mió kr. til Almanna- og heilsuskúlan í Suðuroy, 6 mió kr. til skúla í Marknagili, 5 mió kr. til Fiskivinnuskúla í Vestmanna, 3 mió kr. til Tekniska Skúla í Klaksvík og 0,5 mió kr. til at útvega næmingum í undirvísingarskyldugum aldri eitt annað undirvísingartilboð enn skúlagongd í vanligum 8. og 9. flokki. Somuleiðis eru 5 mió kr. settar av til nýggja tøkni á kringvarpsøkinum.

### *6.6 Raðfestingar undir § 8, Almanna- og heilsumál*

Stutt yvirlit yvir týðandi broytingar innan almanna- og heilsumál frá fíggjarárinum 2004 til fíggjarárið 2005.

**Rakstur**
Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2004 eru 940,75 mió kr. játtaðar til rakstur (netto). Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 eru 996,85 mió kr. játtaðar til rakstur (netto), ein hækking upp á 56,10 mió kr.

**Høvuðsbroytingarnar innan rakstur eru hesar:**

1. **Lønarhækkingar:** Galdandi sáttmálar, sum Fíggjarmálaráðið/Lønardeildin hava gjørt við yrkisfeløgini, merkir eina meirútreiðslu upp á íalt 23,75 mió kr. á rakstrarjáttanum á § 8 Almanna- og heilsumál. Av hesari framskriving hava døgnstovnarnir (sjúkrahúsini, eldrarøktin og serforsorgin vm.) fingið lønarframskriving upp á íalt 22,37 mió kr. Munurin her ímillum, 1,38 mió kr., er ein samlað sparing, ið er framd innan økið.

2. **Nýbygningurin á Landssjúkrahúsinum:** Á fíggjarlógini fyri 2004 eru 5,0 mió kr. játtaðar til nýggja bygningin á Landssjúkrahúsinum, ið tikin er í nýtslu beint eftir summarfrítíðina 2004. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 eru 2,2 mió kr. játtaðar afturat til lønir og rakstur av nýbygninginum.

3. **Økispsykiatri:** Økispsykiatri er sett í verk í 2004 við 2,0 mió kr., ið vóru játtaðar til endamálið. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 eru 1,0 mió kr. játtaðar afturat til eina skipan, ið er í eini uppbyggingarfasu hesi fyrstu árini.

4. **Serforsorg:** Í 2004 lat upp eitt sambýli fyri sinnisveik í Sandavági og eitt sambýli fyri heilaskadd í Tórshavn. Lagt er upp fyri fullum virksemi í 2005 við í alt 1,3 mió kr.

5. **Eldrarøkt:** Innan røktarheim byrjaði Tjarnagarður í 2004, og harumframt letur Vallalíð upp í 2005. Lagt er upp fyri hesum við 9,8 mió kr. Undir Heimarøktini eru fleiri eldrasambýli latin upp í 2004. Fult virksemi í 2005 merkir 8,6 mió kr. meira í játtan, men samstundis roknar Heimarøktin við eini sparing upp á 5,5 mió kr.

**Samanlagdar høvuðsbroytingar innan rakstur 39,77 mió kr.**

**Nýtt virksemi:**

1. Høvuðskonta 8.11.1.41. Talgild heilsuksipan *(nýggj høvuðskonta, rakstrarjáttan)* 9,0 mió kr. Sett av sambært løgtingslóg nr. 31 frá 19. mai 2004, um keyp av talgildari heilsuskipan til føroyska heilsuverkið. Sambært lógini falla 9,0 mió kr. í 2005 og 5,0 mió kr. í 2006.
2. Á høvuðskontu 8.20.3.04. Landssjúkrahúsið *(Rakstrarjáttan)* eru 1,4 mió kr. settar av til øktan tørv til lymfodemviðgerð, at skipa eitt pallitativt toymi á Landssjúkrahúsinum og at økja viðgerðartilboðini innan diabetes í Føroyum, sambært diabetesálitinum frá 2003. Á høvuðskontu 8.20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús *(Rakstrarjáttan)*, og á høvuðskontu

8.20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús *(Rakstrarjáttan)* er eisini sett av til diabetes. 188 tkr. til Klaksvíkar sjúkrahús og 168 tkr. til Suðuroyar sjúkrahús.

3. Høvuðskonta 8.21.1.04. Almannastovan *(Rakstrarjáttan)* hækkar á undirkontu 21. Nýgerð EDV við 2,0 mió kr. Játtanin skal nýtast til at leggja dag- og barnapening inn í eina víðkaða "viðskiftaskipan". 2,0 mió kr. er fyrsta stig, men mett verður, at neyðugt eisini er við játtan til endamálið tey næstu árini.
4. Á høvuðskontu 8.21.6.01. Serforsorg *(Rakstrarjáttan)* eru 2 mió kr. settar av í 2005 til at lata upp eitt sambýli fyri autistar. Harumframt eru 2 mió kr. settar av í 2005 til at lata upp eitt sambýli afturat, sum ein liður í at víðka um virksemið fyri sinnisveik.
5. Eitt nýtt økið er raðfest hesaferð. Tað er dagstovnatilboð til børn við serligum tørvi. Inni í Rók, sum byrjaði í 2001, sum ein royndarskipan verður nú sett á stovn. Samlaða útreiðslan til dagstovnatilboðið er í 2005 2,2 mió kr., harav 1,6 mió kr. eru fluttar frá lógarbundnari játtan. Harumframt byrjar ein serdagstovnur, fyri 8 børn, í 2005. 1,4 mió kr. eru settar av til hetta endamálið.

**Samanlagt nýtt virksemi íalt 20,40 mió kr.**

**Týðandi útreiðsluhækkingar:**

A) Høvuðskonta 8.20.2.05. Útbúgving av yngri læknum *(Rakstrarjáttan)* hækkar við 0,9 mió kr., sum framhaldandi liður í at styrkja um útbúgving av kommunulæknum og sjúkrahúslæknum.

B) Játtanin til høvuðskontu 8.20.3.20. Serviðgerð uttanlands *(Rakstrarjáttan)* hækkar við 3,7 mió kr., sum er mettur vøkstur.

C) 8.21.2.08. Børn og ung (Rakstrarjáttan) undirkonta 22. Bústovnur fyri ung, hækkar vegna fult virksemi í 2005 við 0,7 mió kr.

D) 8.21.6.04. Eldrarøkt *(Rakstrarjáttan)* undirkonta 27. Økisterapi, hækkar við 0,4 mió kr., og verður sostatt eitt øki afturat nøktað við hesi tænastu.

**Samanlagt tíðandi útreiðsluhækkingar upp á íalt 5,70 mió kr.**

**6. Týðandi útreiðslulækkingar:**

A) Játtanin til høvuðskontu 8.11.1.08 Almanna- og heilsumálaráðið lækkar við góðum 1,3 mió kr., tveir triðingar av lækkingini eru lønarniðurskurður, restin 0,4 mió kr. er flyting til høvuðskontu 8.11.1.8. Viðlíkahald *(rakstrarjáttan)*, sí undir punkt B), niðanfyri.

B) Høvuðskonta 8.11.1.18. Viðlíkahald *(Rakstrarjáttan)*, lækkar við 0,6 mió kr. Kontan er fyrst lækka við 1,0 mió kr. sum sparing, eftirfylgjandi eru 0,4 mió kr. fluttar frá høvuðskontu 8.11.1.08. Almanna- og heilsumálaráðið. Játtanin upp á 0,4 mió kr. skal nýtast til viðlíkahald á Suðuroyar sjúkrahúsi.

C) Ein sparing í fyrisiting og rakstri á sjúkrahúsunum og á meginskrivstovuni fyri serforsorg og eldrarøkt gevur samlað 1,7 mió kr.

D) Landsstýrið hevur eisini gjørt av, at sparast skal í ferðaútreiðslunum. Ferðakarmurin fyri § 8 er lækkaður við 0,7 mió kr.

E) Hækking av gjaldi til brúkarar, ið búgva á sambýlum innan serforsorg og eldrarøkt, og gjald fyri umlætting á røktarheimum gevur eina sparing upp á íalt 4,0 mió kr.

F) 8.21.6.01 Serforsorg *(rakstrarjáttan)* undirkonta 21. Stovnsuppihald o.a. í Danmark, lækkar við 2,5 mió kr., orsaka av at brúkarir í skipanini fella burtur.

**Samanlagt tíðandi útreiðslulækkingar upp á 10,80 mió kr.**

Aðrar smávegis broytingar/raðfestingar eru gjørdar innan rakstrarkarmin á § 8 Almanna- og heilsumál.

Rakstrarkarmur: Broyttar útreiðslur/raðfestingar, samandráttur

| Virksemi | Mió. kr. | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **Rakstrarkarmur 2004** | **940,75** | |
| **Broyttar útreiðslur/ raðfestingar 2005** | **56,10** | |
| Samandráttur høvuðsbroytingar | 39,77 | Lønarhækkingar, nýbygningur á Landssjúkrahúsinum, økispsykiatri, sambýli fyri sinnisveik, og sambýli fyri heilaskadd, Tjarnargarður, Vallalíð umframt nýggj eldrasambýli. |
| Samandráttur nýtt virksemi | 20,40 | Talgild heilsuskipan, lymfodemviðgerð, palliativt toymi og diabetes innan sjúkrahúsinin, EDV til Almannastovuna, sambýli fyri autistar, dagstovnur Inni í Rók og serdagstovnur. |
| Samandráttur, tíðandi útreiðsluhækkingar | 5,70 | Yngri læknar, serviðgerð uttanlands, bústovnur fyri ung og økisterapi. |
| Samandráttur tíðandi útreiðslulækkingar | 10,80 | Lønarlækking og flyting av rakstri hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, sparing í viðlíkahaldi, sparing í fyrisiting og rakstri í sjúkrahúsunum og í meginskrivstovuni fyri serforsorg og eldri, lækking í ferðakarmi, hækking av brúkaragjøldum og gjald til umlætting, brúkarar fella burtur undir stovnspláss í Danmark. |
| **Aðrar hækkingar/lækkingar samanlagt** | **1,03** | Ymsar smáar broytingar. |
| **Rakstrarkarmur fyri 2005** | **996,85** | |

**Lógarbundnar útreiðslur**
Á fíggjarlógini fyri 2004 eru 834,00 mió kr játtaðar til lógarbundnar útreiðslur. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 eru 842,72 mió kr. játtaðar, ein hækking upp á 8,72 mió kr. Ein generel hækking kemur av lógini um javning av almannaveitingum, har ein partur av veitingunum innan almannamál verður javnaður við 4% á hvørjum ári. Nevnast kann at fyritíðarpensiónirnar hækka við 4,2 mió kr.

Dagpeningaskipanin vísir eina lækking í útreiðslum frá 2004 til 2005 upp á íalt 2,5 mió kr., meðan forsorgarútreiðslurnar vaksa við íalt 4,2 mió kr. Tó eru stórar broytingar á undirkontustigi. Undirkonta 04. Meirútreiðsla brekað børn § 17, hækkar við 7,0 mió kr., meðan útreiðslurnar til undirkontu 06. Hjálparamboð vm. § 18, lækka við 9,0 mió kr.

Arbeitt verður í løtuni við fleiri tíðandi lógarbroytingum, millum annað barnaforsorgarlóg og forsorgarlóg. Eisini verður arbeitt við broyting í lóg og í kunngerð um stuðul til heilivág og at áseta nýggja kunngerð um hjálpitól. Hesar broytingar eru mettar at geva sparingar á fíggjarlógarupp-skotinum fyri 2005 upp á íalt 3,5 mió kr.

**Løgur**
Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 verður biðið um eina samlaða játtan til løgur upp á 46,00 mió kr. (netto), sum er ein lækking upp á 14,50 mió kr. í mun til løgtingsfíggjarlógina fyri 2004. Størsta einstaka játtanin er til út- og umbygging á Landssjúkrahúsinum 35 mió kr., harumframt eru 18 mió kr. játtaðar til studningslán, til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, og 10 mió kr. til at endurnýggja teknisku útgerðina á røntgendeildunum á øllum trimum sjúkrahúsunum. Í løgukarminum er ein inntøka upp á 30 mió kr., av at selja íbúðabygningarnar á Landssjúkrahúsinum. Viðmerkjast skal at nýggj høvuðskonta til løgur er stovnað, 8.20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (*løgujáttan)* 2,0 mió kr. Játtanin skal nýtast til umvæling og umbygging av taki vm.

**Aðrar útreiðslur**
Játtaðar eru 41,77 mió kr. til aðrar útreiðslur á fíggjarlógini fyri 2004. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 eru 43,90 mió kr. játtaðar, ein hækking upp á íalt 2,1 mió kr. Hækking er á játtanini til høvuðskontu 8.20.2.01 Sjúkrakassarnir. upp á 2,4 mió kr. Aðrar broytingar hækking/lækking geva eina samlaða lækking upp á 0,3 mió kr. undir hesum játtanarslagi.

**Samanumtikið**
Samlaði rakstrar-, lógarbundin- og íløgukarmurin fyri § 8 almanna- og heilsumál, hækkar við 54,41 mió kr. frá 1.875,06 mió kr. til 1.929,47 mió kr. frá 2004 til 2005.

### *6.7 Raðfestingar undir § 15, Innlendismál*

Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur í sambandi við tillutaðan játtanarkarm fyri § 15 lagt dent á fylgjandi raðfestingar í uppskoti til fíggjarlóg fyri 2005:

**Uppraðfestingar**
Samgongan hevur avtalað, at tinglýsingin skal takast heim aftur.

Ætlanin er at skipa arbeiðið sum ein verkætlan, ið skal vera liðug 1. juli 2005, og settar eru av slakar kr. 500.000 til arbeiðið.

Ætlanin er somuleiðis at raðfesta havumhvørvisøkið og uppskot til løgtingslóg verður lagt fyri Løgtingið í vetur.

Av øðrum raðfestingum, ið verða í Innlendismálaráðnum í 2005, kunnu nevnast útlendingamál, at gera eina kommunala roknskaparskipan fyri kommunurnar og at privatisera Farmaleiðir.

**Sparingar innan miðfyrisitingina**
Lønarútreiðslur á høvuðskontu 15.11.01 Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) verða minkaðar við á leið 10% í mun til framskrivaðar lønir. Hetta merkir, at 18,32 ársverk verða í Innlendismálaráðnum í 2005. Í 2004 eru 21,07 ársverk í Innlendismálaráðnum.

Játtanin til umhvørvisverndartiltøk (onnur játtan) verður lækkað við kr. 190.000.
Stuðul til útoyggjamenning (onnur játtan) verður lækkað við kr. 30.000 og stuðul til træplanting verður lækkað við kr. 50.000.

**Sparingar á stovnum undir aðalráðnum**
Lønarútreiðslurnar hjá Strandfaraskip Landsins á sjónum eru framskrivaða við lønarkompensión fyri sáttmálahækkingar meðan á landi og hjá hinum stovnunum annars undir aðalráðnum er ongin lønarkompensatión fyri sáttmálahækkingar, og merkir hetta, at játtanin til lønir til hesar stovnar verður tann sama í 2005 sum í 2004.

Stovnarnir undir aðalráðnum eru umframt Strandfaraskip Landsins, Dátueftirlitið, Skógrøktin og Føroya Kærustovnur.